| | Býráðsfundur<br>28. januar 2016 | Blað nr.: 1 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 28. januar 2016 **Kl**. 18:00
**Stað**: býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Jan Christiansen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen
Sigrun Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Mikael Viderø

**LUTTÓKU IKKI:**
Bogi Andreasen, ið var burturstaddur
Halla Samuelsen, ið var burturstaddur

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# 5/16 Mál beind í nevndir 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

## 6/16 Uppsamlingsmál ár 2016 : Býráðslimir - farloyvi 14 dagar ella meir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 6/16 | 16/00682-1 |

**Málslýsing:**

**Málslýsing**:

Bogi Andreasen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jan Christiansen, eru loknar.

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt.

# 7/16 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2015 | 47/15 | 15/00579-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 22/15 | 15/00579-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.03.2015 | 85/15 | 15/00579-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 88/15 | 15/00579-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 65/15 | 15/00579-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 170/15 | 15/00579-1 |
| 7 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 113/15 | 15/00579-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 187/15 | 15/00579-1 |
| 9 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 145/15 | 15/00579-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 261/15 | 15/00579-1 |
| 11 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 176/15 | 15/00579-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 323/15 | 15/00579-1 |
| 13 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 233/15 | 15/00579-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 35/16 | 15/00579-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 7/16 | 15/00579-1 |

**Málslýsing**:
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Góðkent.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 25. mars 2015:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars verður lagdur fram á fundinum.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Roknskapurin fyri mai, juni, juli og august framlagdur og góðkendur.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen og Sjúrður Olsen luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:**Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt góðkent

## 8/16 Eigarafelagið á Fløtum. Avtøka av servitutti viðv. felags antennuskipan.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 9/16 | 15/02293-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 8/16 | 15/02293-2 |

**Málslýsing:**

Eigarafelagið á Fløtum boðar frá, at aðalfundurin í 2015, samtykti at heita á Tórshavnar Kommunu um, at taka burtur teir servituttir, ið viðvíkja felags antennuskipan á økinum, og sum eru álagdir teimum matriklum, ið eru tengdir at Eigarafelagnum á Fløtum í Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at góðkenna viðtøkubroytingarnar fyri Eigarafelagið á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

## 9/16 Innrætta heilsuhús í realskúlanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.12.2015 | 46/15 | 15/04903-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 14/16 | 15/04903-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 9/16 | 15/04903-1 |

**Málslýsing:**
Ætlanin um Heilsuhús hevur verið og er framhaldandi sera týðandi partur av grundarlagnum fyri samlaðu Heilsu- og umsorganartænastuni.

Heilsuhúsið hugsast vera bæði ein bygnaðarlig eind og ein fysiskur bygningur. Hetta síðsta hevur tó mangla at fáa útint. Sum tíðin er gingin, er greitt, at tað er alneyðugt bæði fakliga, tænastuliga og trivnaðarliga fyri starvsfólkini at fáa skipað fysiska Heilshúsið sum skjótast, hetta eisini um politisku málini, ið býráðið hevur sett fyri Heilsu- og umsorganartænastuna, skulu kunna røkkast.

Heilsuhúsið er ein bygnaðarlig og faklig nýskipan, sum skal tryggja tvørgangandi og tvørfakligar loysnir uppá einstøku uppgávuna – t.e. rætta tænastan og/ella tilboðið til ítøkiliga tørv einstaka borgarans. Tvs. grundarlagið undir teirri heildartænastu, sum lógin áleggur, har allar borgarargongdir – vanligar eins væl og tær meira kompleksu/tvørfakligu og bráðfeingis, verða samskipaðar og samskapaðar.

Heilsuhúsið er fyrsta samband hjá borgarunum til tænastur og tilboð, og haðani verður borgarin visiteraður til tær tænastur og/ella tey tilboð, honum tørvar. Heilsuhúsið skal tí vera eitt virkið og dynamiskt hús, sum framleiðir bestu tænastur og tilboð málrættað til einstaka borgaran og strategiskt í mun til langtíðar tørv, og sum altíð brúkar tvørfakliga, starvsfólkaliga og fíggjarliga tilfeingið í Heilsu- og umsorganartænastuni mest optimalt.

Fyri tíð síðan er fráboðað ætlan um, at Heilsuhúsið skal halda til í gamla realskúlanum. Ætlanin er, at allur realskúlin skal brúkast til Heilsuhúsið. Til tess eru nøkur brunakrøv og krøv um atkomuviðurskifti, sum skulu uppá pláss, umframt onnur arbeiði við el, kt o.ø. Um allur bygningurin skal takast í nýtslu í einum, er kostnaðurin mettur til uml. kr. 6 mió íroknað øll brunakrøv, atkomuviðurskifti (rampu við automatiskari úthurð), el- og kt-leiðingar, innbúgv, útgerð v.m.

Ein avmarkað loysn at byrja við, har bert niðara hæddin verður tikin í nýtslu, verður mett at kosta uml. kr. 1,5 mió.

Heimatænastan og móttøkan, sum í dag eru í leigaðum hølum í gomlu Dimmalætting á Hálsi, hevur einki stað at vera eftir 1. januar 2016. Leigumálið átti upprunaliga Almannaverkið, og tað gongur út á nýggjárinum, og gangast kann ikki undir treytir frá útleigarunum (Eik banki) til framhald av leigumálunum.

At fáa høli til heimatænastuna og móttøkuna í seinasta lagi pr. 1. januar 2016 hevur tí bráðskund.

Til tess at kunna flyta inn í bygningin skjótt, er gjørd ein innrættingarætlan fyri niðaru hæddina, sum í mestan mun livir upp til ætlaðu fyrimunirnar við at skipa eitt Heilsuhús. Sambært hesi innrættingarætlan flytur øll heimatænastan, leiðslutoymið, móttøkutoymið,

visitatiónstoymið og dygdartoymið inn í realskúlan, eins og at klinikkin verður skipað sum ætlað.

Heimavitjanartænastan (gl Heilræði) og terapeuttoymini verða ikki flutt í Heilsuhúsið í hesum umfari. Mál má tí vera, at fígging fæst til vega at fáa loftið gjørt seinni í 2016 ella í 2017 til tess at hesar og møguligar aðrar viðkomandi funktiónir eisini kunnu flyta inn, so sum upprunaliga ætlanin við Heilsuhúsinum er.

Av arbeiðum, sum skulu gerast fyri at taka niðaru hædd í nýtslu til Heilsuhús, er at rudda kjallaran fyri alt eldfimt, at gera nøkur neyðug brunaátøk í kjallaranum (at gipsa), at fáa gjørt ymiskt el- og kt arbeiði, at gera rampu uttanfyri og automatiska úthurð til at lúka krøv um atkomu, lásaskipan v.m. Harumframt at fáa til vega innbúgv og neyðuga útgerð. Øll arbeiðini verða ikki liðug til 1. januar 2016, men nakað inn í 2016. Eftir ætlan ber tó til at fáa skipað heimatænastuna og telefonmóttøkuna á nýggjárinum.

Á grein 2 íløgukonta 2775 eldrarøkt eru tøkar kr. 368.000. Játtanin er ikki markað til ávíst endamál. Henda kann sostatt nýtast til at fíggja part av fíggjartørvinum til at innrætta Heilsuhúsið.

Á løgukarminum 2016 á grein 2 er harumframt kr. 1 mió sett av til verkætlan, sum skal lýsa tørv og møguleikar sum grundarlag fyri at gera langtíðarstrategi til tess at útvega hóskandi íbúðir og røktarbúpláss annars (j.nr. 15/04601). Verkætlanaruppskot verður latið trivnaðarnevndini á fyrsta fundi í januar 2016. Talan er um sera týðandi strategiska verkætlan fyri Heilsu- og umsorganartænastuna og kommununa sum heild, at mett verður á ongan hátt skilagott at brúka játtanina til innrætting av Heilsuhúsinum ístaðin.

Trivnaðarnevndin hevur ikki aðra íløgujáttan at ráða yvir.

Tørvur er sostatt á kr. 1,2 mió aftrat, sum mett verður má fáast til vega á samlaða íløgukarminum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at Heilsuhús í fyrsta umfari verður skipað bert í niðaru hæddini í realskúlanum og í hesum sambandi at játta kr. 368.000 á íløgukontu 2775 eldrarøkt til innrætting, myndugleikakrøv, el- og kt arbeiði, innbúgv, útgerð v.m. Harumframt verður mælt til, at trivnaðarnevndin fær til vega aðrar kr. 1,2 mió til arbeiðið á íløgukarminum.

**Trivnaðarnevndin 16. desember 2015:** Ein meiriluti, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Halla Samuelsen og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur ikki undir við tilmælinum grundað á, at umvælingin verður ov dýr og hølini óegnað til endamálið. Mælt verður ístaðin til at byggja nýtt til tess at røkka endamálinum við Heilsuhúsinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í trivnaðarnevndini og játtar kr. 368.000 á íløgukontu 2775 eldrarøkt til innrætting, myndugleikakrøv, el- og kt arbeiði, innbúgv, útgerð v.m og aðrar kr. 1,2 mió til arbeiðið av konto 6110, umsiting og røkt av bygningum. Málið beint í býraðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu í býráðnum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal um heldur at byggja nýtt til tess at røkka endamálinum við Heilsuhúsinum, grundað á at umvælingin verður ov dýr og hølini óegnað til endamálið, ið fall 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen

Greiddi ikki atkvøðu:
Elin Lindenskov,

Síðan var atkvøtt um meirilutatilmæli í trivnaðarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

# 10/16 Umsókn um stuðul til umvæling av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll - skeyti 1386 - ymiskt tilfar í eini kassettu (1999-0345)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 203/14 | 14/04763-136 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 202/15 | 14/04763-136 |
| 3 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 225/15 | 14/04763-136 |
| 4 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 275/15 | 14/04763-136 |
| 5 Mentamálanevndin | 25.11.2015 | 234/15 | 14/04763-136 |
| 6 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 299/15 | 14/04763-136 |
| 7 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 237/15 | 14/04763-136 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.12.2015 | 254/15 | 14/04763-136 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.12.2015 | 332/15 | 14/04763-136 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 3/16 | 14/04763-136 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 15/16 | 14/04763-136 |
| 12 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 10/16 | 14/04763-136 |

## Málslýsing:

Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini

tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða “høllin” í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og um-væling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í “føroyskum kr” 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | |
|---|---|
| Hækka játtanina til konto 82 | kr. 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. 22.903.095 |
| | |
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | |
|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. 8.000.000 |

| | |
|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. 9.000.000 |




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

<u>at</u> peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

<u>at</u> peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**

Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.

| | |
|---|---|
| 1. byggistig: | 1. februar 2008 – 31.oktober 2008 |
| 2. byggistig: | 1. januar 2009 – 1. februar 2010 |
| 3. byggistig: | 1. apríl – 27. august 2010 |
| 4. byggistig: | 1. september – 30. juni 2011 |

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært

”Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir”

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út- og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsingar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:
Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| | | |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |
| Mvg 6,25% | kr. | 390.927 |
| | | |
| Samlað við MVG | kr. | 6.696.202 |

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Lisitatiónin var 22. des. 2010 og tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| ÁTS S/pf. | 6.117.725,56 kr. |
| Karstin A. Joensen S/pf. | 6.183.979,25 kr. |
| Valbjørn Dalsgarð S/pf. | 6.302.015,96 kr. |
| Bjarni Poulsen S/pf. | 6.343.814,48 kr. |

| | |
| --- | --- |
| Búsetur S/pf. | 6.545.180,00 kr. |
| Húsavarðatænastan S/pf. | 6.678.556,15 kr. |
| | |
| Metingin hjá HMP-Consult | 6.725.000,00 kr. |

HMP-Consult hava kannað tilboðini, og mæla til at taka upp samráðingar við ÁTS, sum áttu lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í skrivi til mentamáladeildina dagf. 13. september 2011 vísa leiðarin á Hallarumsitingini og leiðarin á Húsaumsitingini á bráðneyðugan tørv at skifta gólvið og takið. Víst verður á, at gólvið er í sera ringum standi og krevur nógv dagligt viðlíkahald, og tí treingir tað til at skiftast. Víst verður eisini á, at tá hugsað verður um, at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða, tá takið verður skift.
Høllin á Hálsi tørvar eina størri umvæling bæði innan og uttan. Ein heildarumvæling av høllini verður sambært HMP Consult mett at kosta millum kr. 18-20 mió. Á fíggjarætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg eru í 2012 settar kr. 2,5 mió av til framhaldandi umvælingar, sambært fíggjarætlanartekstinum skulu m.a. gólvið og takið skiftast. Greitt er, at til ber ikki at skifta bæði gólvið og takið í einum fyri hesa upphædd, men fíggingin røkkur til at skifta gólvið.

Høllin hevur øll árini verið karmur um fleiri ítróttagreinar, samkomutiltøk, handilsmessur, dans og konsertir o.a. mangt. Krøv til gólv eru ymisk, alt eftir, hvat virksemið skal vera – eitt nú skal gólv til ítrótt vera bleytt, tó at krøvini hjá ymsu ítróttagreinunum eisini kunnu vera ymiskt. Gólv til eitt nú at bera bilar skal hinvegin vera hart.

Gamla gólvið hevur víst seg at vera sera gott og haldført. Ætlanin er, at høllin eisini framyvir skal vera karmur um fjøltáttað virksemi. Metast má tí skilagott, at nýggja gólvið verður bygt upp á sama hátt við møguligum smáum betringum. Ætlanin er ikki at broyta høllina annars.

Fyri ikki at órógva kappingarárið 2012-2013 ov nógv, er neyðugt, at arbeiðið at skifta gólvið verður byrjað og gjørt liðugt beinanvegin. Tá takið verður skift, verður neyðugt at verja gólvið væl, so at tað ongan skaða fær. Mælt verður tí til, at tøka íløgujáttanin kr. 2,5 mió verður brúkt til at skifta gólvið.

Fyri at arbeiðið skal ganga so skjótt sum møguligt, verður mælt til, at Húsaumsitingin, í samstarvi við Hallarumsitingina, standa fyri upptøku og burturbeining av gamla gólvinum, meðan arbeiðið at keypa og leggja nýggja gólvið á verður bjóðað út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Mett verður tó eisini neyðugt, at gongd verður sett á heildarumvælingarnar, t.e. millum annað at skifta takið, ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan. Til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi. Mælt verður harumframt til, at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti Jógvan Arge, Maria Hammer Olsen og Elin Lindenskov mæla til at peningur verður játtaður at skifta takið v.m. í 2013.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen mæla til at fylgja tilmælinum at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 2,5 mió. Av konto 5775, ítróttaranlegg, til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið uppá útskifting av gólvplátum og álegging av nýggjum sportslinoleum er boðið út sum undirhondsboð av HMP- Consult, ið eru ráðgevar í málinum. Tilboðini vóru hesi, uttan mvg:

Skifta gólvplátur v.m.

- Træsmiðjan Sp/f 598.210,- kr.
- Articon P/f 537.480,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 520.000 kr.

Nýtt sportlinoleum v.m.

- Gólvbúni Sp/f. 414.750,- kr.
- Eyðfinn K. Eyðunsson Fa. 388.500,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 424.000,- kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini og mæla til at skriva arbeiðstøkusáttmála við ávikavist Articon og Eyðfinn K. Eyðunsson, sum áttu lægstu tilboðini.

Eftir samráðingar við Articon um nakrar broytingar, er semja um sáttmálaupphæddina kr. 437,000,-.

Viðv. samlaða fíggjartørvinum verður víst til j. nr. 2012-1785.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðunum við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, frá ávikavist Articon á kr. 437.000 og Eyðfinn K. Eyðunsson á kr. 388.500, og at heimila umsitingini at gera arbeiðstøkusáttmálar við hesar.

**Mentamálanevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Maria H. Olsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðunum frá Articon við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, og at umsitingin fær heimild til at taka upp samráðingar við Eyðfinn K. Eyðunsson og Gólvbúna Sp/f og gera sáttmála um eitt gólv/sportslinoleum av sama slag sum verandi gólv.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi hevur stóran umvælingartørv. Í fjør varð gólvið skift (konta 5775, L 57003 Høllin á Hálsi). Sum tað framgongur av málslýsingini omanfyri, er bráðneyðugur tørvur á at skifta takið í høllini. Víst verður eisini á, at ein heildarumvæling av høllini er neyðug, tað er at skifta takið, nýggja ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan.

Við støði í kostnaðarmeting frá september 2011 varð mett, at til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014. Á íløguætlanini fyri 2013 eru settar kr. 10 mió, sum í høvuðsheitum røkkur til at fáa skift takið og orkusparandi ventilatiónsskipan. Harumframt er eitt avlop á kontu L57003 uppá umleið 1 mió, sum kann verða flutt til tey arbeiði, sum gerast skulu í summar.

Sum fyrireikingar av arbeiðinum skal útbjóðingartilfar gerast. Mælt verður til at bjóða byggiarbeiðið út sum innboðin lisitatión. Ætlandi skal arbeiðið fremjast í summar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión. Harumframt verður mælt til at játta kr. 10 mió av íløgukontu 5775 fyri 2013 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta 10

mió. kr. av íløgukonto 5775 fyri 2013 til arbeiðið og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**<u>Ráðgevarasáttmálar Ráðgevarasáttmálar</u>**

**31-05-2013** Hevur HMP undirskriva ráðgevarasáttmála fyri bygnings- og EL arbeiðir.

**04-06-2013** hevur pb Consult undirskriva ráðgevara sáttmála fyri ventilatiónsprosjekt.

**21-06-2013** hevur verið licitatión fyri bygnings- og EL arbeiðir.

Innkomin tilboð:

| Felag: | Upphædd | Fyrivarni: |
|---|---|---|
| Articon: | Kr. 13.875.468,00 | ABF 06 |
| TG Verk | Kr. 12.873.516,98 | Tíðarætlan (Sí Skriv) |
| Búsetur | Kr. 8.635.052,01 | ABF 06 |
| Húsavarðatænastan | Kr. 9.624.351,00 | ABF 06 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum hjá Búsetur á kr 8.635.052,01.

**Mentamálanevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi er bygd í 1970 , hevur verið meginhøllin í býnum í fleiri áratíggju og hýsir alskyns virksemi innan ítrótt, mentan, vinnu v.m. Tørvurin innan økið økist alsamt. og verður mett at ein útbygging av Høllini á Hálsi vil hava fleiri fyrimunir samanlagt í mun til kostnað, nyttuvirði og rakstur.

Tey arbeiði, sum hava verið gjørd við nýggjum umklæðingarrúmum og w.c. á eystursíðuni, nýggjum hallargólvi, taki og endaveggi uppi á tekjuni suðureftir umframt røð av brunaátøkum, eru øll gjørd við støði í prosjektinum hjá BBP arkitektum frá 2007.

Mett verður skilagott, at komandi um- og útbyggingar eisini taka støði í hesum. Tó kann verkætlanin tillagast soleiðis, at ætlað flyting av hallargólvi ikki verður gjørd, tí nyttan í mun til kostnað er ikki so áhugaverd. Eisini kann útbyggingin suðureftir tillagast ávísum kostnaðarkarmi, meðan útbyggingin norðureftir, sum er tann, ið skal geva fleiri hallartímar, kann vaksa fyri at fáa meira nyttu.

Við at byggja út norðureftir 23m heldur enn bert 18,5m, sum BBP-prosjektið hevur, so er rúm fyri tveimum flogbóltsvøllum, eins og hetta er hálvur hondbóltsvøllur aftrat til venjing. Hetta gevur sostatt fleiri hallartímar aftrat og atknýtt goymsluhøli.

Umframt tann ítróttaliga fyrimunin, so ger henda loysnin, at umstøðurnar verða munandi betri, tá stór tiltøk eru t.d. stevnur, konsertir og møtir. Høllin rúmar tá minst 2.500 fólkum.

Týðandi er, at byggingin órógvar virksemið í høllini sum minst. Tí er eisini fyrimunur, um útbyggingin norðureftir verður framd fyrst, og at ætlanirnar serliga á suðursíðuni verða endurskoðaðar. Prosjektering og støðutakan til útboð av norðurendanum kann verða klárt til januar 2016.

Útbyggingin hevur avleiðingar fyri parkeringsumstøðurnar á Hálsi og í Gundadali. Møguleiki er at útvega 130 nýggj parkeringspláss á lendinum framvið R.C. Effersøesgøtu. Hetta eigur at verða tikið við í hallarverkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fara undir sum fyrsta stig at prosjektera og fáa til vega útbjóðingartilfar av útbygging norðureftir 23m samsvarandi lýsingini omanfyri.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Nevndin samtykti at útvega kostnaðarmeting av hesi loysnini og at arbeitt verður við at staðseta og kostnaðarmeta eina heila høll á Gundadals-leiðini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samskifti við Sp/f HMP Consult um eina tillagaða útgávu av BBP-verkætlanini, har tað tó verður hildið fast við verandi byggistíl o.a.

Til ber at realisera eina verkætlan við útbygging norðureftir við einum hálvum vølli, gera vestursíðuna uttan lidna, umframt útbygging suðureftir til judo, borðtennis, móttøkuøkið o.a. fyri 34,9 mio.kr. uttan MVG á 6,25%.

Mett byggitíð er eitt gott ár. Útboð uppá norður og vestursíðuna kann verða um ársskiftið og uppá suðursíðuna í mars. Neyðugt er við smærri tillagingunum í projekteringini av suður-verkætlanini. Til ber eisini at gera parkeringøki við 130 plássum í lendinum millum høllina og R.C. Effersøesgøtu fyri 4,15 mio.kr. umframt kommununar MVG á 6,25%.

Henda útbygging av Høllini á Hálsi og útbyggingin av høllini í Skúlanum á Argjahamri økir um tímatalið, sum til ber at brúka hallirnar til venjing. Sum støðan er í dag, eru 97 tímar at býta til flogbólt og hondbólt. Við at útbyggja á Argjum og á Hálsi verða 166 tímar tilsamans til hondbólt, flogbólt og kurvabólt.

Í Høllini á Hálsi koma í dag lið inn einaferð um tíman. Tá útbygt er, koma lið inn hvønn hálva tíma, tí tey hita upp á hálva vøllinum (útbygdi vøllurin) og fara síðan inn á heila vøllin (verandi vøllur), og tá kann næsta lið koma inn á hálva vøllin til upphiting og venjing. Mett verður, at hetta gevur uml 70% fleiri venjingartíðir, tí skipanin kann ikki nýtast til fulnar til liðini í fremstu deildunum, tí tey vanliga venja 1,5 tíma. Talan er sostatt um munandi meira fleksibla skipan.

Ein annar vinningur er, at tíðin millum dystir gerst styttri, tí størri parturin av upphitingini kann fara fram á hálva vøllinum.

Høllin á Hálsi er eitt slag av tjóðarítróttahøll og fer útbyggingin at styrkja um tann leiklutin innan ítróttin, umframt tað ymiska fjølbroytta mentanar- og handilsvirksemi sum annars er í høllini av og á. Haraftrat er Høllin á Hálsi valstað í býnum o.s.fr.

**Viðv. kostnaðarmeting og staðseting av heilari høll á Gundadalsleiðini**
Ein møguleiki er at byggja eina nýggja høll í økinum suður úr Tórsbreyt. Talan er um matr. 1393a ogn hjá P/F Eik Banka. Ein fult útbygd nýmótans høll ella hallardepil har fer at kosta væl meir enn avsetti kostnaðarkarmurin fyri bygging av ítróttahøllum, ið er tøkur, og sum ætlanin er at játta í 2016. Eisini má væntast, at henda ætlan ber ikki til at realiserað innan stutta tíð.

Hartil skal havast í huga, at í byggiverkætlanini fyri Skúlan á Fløtum er ein ítróttahøll við 400 áskoðaraplásum, sum partur av byggistigi 2, ið verður liðugt á sumri 2019. Haraftrat verður ein ítróttahøll í Marknagilsdeplinum, og er ætlanin at gera avtalu við depilin um at umsita part av hallartíðunum, tá depilin ætlandi er liðugur miðskeiðis í 2017.

Talva við tímum í høllunum er viðfest.
Kostnaðarmeting fyri útbygging av Høllini á Hálsi er viðfest.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at

- at heimila umsitingini at fara undir útboð av verkætlanini í sonevndum øvugtum útboði í eini heildararbeiðstøku innan fyri karmin á 34,9 mio.kr.,
- at heimila umsitingini at fara undir útboð av parkingsverkætlanini í einum útboði í heildararbeiðstøku innanfyri karmin á 4,15 mio.kr.
  og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Útsett til komandi fund.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Útsett.

**Ískoyti**

**Útbygging norðureftir av høll í fullari longd, kostnaðarmeting o.a.**
Umsitingin hevur samskift við Sp/f HMP Consult um eina tillagaða útgávu av BBP-verkætlanini í norðurendanum til fevna um eina høll í fullari longd (hondbóltsvøllur), har tað tó verður hildið fast við verandi byggistíl o.a. so vítt til ber, umframt aðrar betranir.

Til ber at realisera eina verkætlan við útbygging norðureftir við einum fullum vølli, gera vestursíðuna uttan lidna (og teimum umvælingum innandura, sum standast av hesum), men ikki útbygging suðureftir til judo, borðtennis, móttøkuøkið o.a. fyri kr. 28,5 mió í handverkaraútreiðslum (HVÚ) u/mvg. Tá er eisini roknað 130 parkeringsplássum í lendinum millum høllina og R.C. Effersøes gøtu. Mett byggitíð er 18 mánaðir. Útboð uppá verkætlanina kann verða í apríl 2016, eftir at neyðug projektering er gjørd. Neyðugt er við ávísum tillagingum í áður gjørdari projektering av norðurverkætlanini.

Kostnaðarmeting og nærri greiningar fyri útbygging av Høllini á Hálsi eru viðfestar, umframt strikutekningar og visualiseringar (visualiseringar verða tøkar mikudagin).

**Nýtsluendamál og hallartímar**
Henda útbygging av Høllini á Hálsi, og útbyggingin av høllini í Skúlanum á Argjahamri økir munandi um tímatalið, sum til ber at brúka hallirnar til venjing. Sum støðan er í dag, eru 97 tímar at býta til flogbólt og hondbólt. Við at útbyggja á Argjum og á Hálsi verða 176 tímar tilsamans til hondbólt, flogbólt og kurvabólt. Verður bygt út við hálvari høll á Hálsi verða tímarnir til hondbólt, flogbólt og kurvabólt 166 tilsamans.

Tað vil siga at tey stóru feløgini(H71, Neistin, Kyndil og Fleyr) kunnu í grundreglum hava hvør sína høll og ÍA og kurvabólt feløgini kunnu deilast um eina høll.

Við heilum vølli afturat á Hálsi kunnu dystir eisini spælast har eins og á Argjahamri.

Um bygt verður sum víst er á tekningunum, verður stórt øki á eystursíðuni, sum kann brúkast til upphiting  bæði til dystir og venjing, sum í dag fer fram í geingjunum, sum er óheppið. Eisini kunnu høllini á eystursíðuni brúkast t.d. til borðtennis o.a. umframt betri goymslumøguleikar.

Tá tiltøk verða í høllini so sum stevnur, møtir, jólasøla og onnur tiltøk sum bert skulu brúka eina høll kann venjast í hinari høllini meðan gjørt verður klárt til tiltøkini, tað vil siga at munandi minni avlýsingar verða hjá feløgunum.

Høllin á Hálsi er eitt slag av tjóðarítróttahøll, og fer útbyggingin at styrkja tann leiklutin. Haraftrat er Høllin á Hálsi valstað í býnum. Høllin kemur at hava pláss fyri umleið 1800 áskoðarum á verandi áskoðaraplássum, umframt tveimum áskoðarapallum, sum kunnu flytast. Hetta fer m.a. geva ítróttafeløgunum møguleika fyri at fáa væl størri inntøkur í sambandi við t.d. finalur í hondbólti og altjóða dystir.

**Judofelagið og borðtennisfelagið**
Judofelagið í Tórshavn hevur 26 íðkandi limir sbrt. yvirlitinum hjá ÍSF frá juni 2015, og í øllum landinum eru 66 íðkandi. Judofelagið venur og hevur kappingar í fimleikahøllini í Eysturskúlanum. Felagið hevur í løtuni 12 tímar um vikuna.
Eitt av teimum feløgunum, ið hevur ynski um betri og støðugari hølisviðurskifti, er Borðtennisfelagið Tór (t.e. borðtennisfelagið í Tórshavnar kommunu). Felagið hevur í løtuni 30 íðkandi sbrt. frágreiðingini hjá ÍSF frá juni 2015, og í øllum landinum eru 68 íðkandi.

Borðtennisfelagið hevur í dag venjingar í høllini í Skúlanum við Løgmannabreyt og í Eysturskúlanum. Borðtennisfelagið Tór hevur 12 hallartímar um vikuna. Felagið hevur stórt ynski um at fáa betri egnað høli til venjing, og at venjingin er á einum stað. Í øðrum tilmæli sæst at tilmælt verður at venjingar teirra verða staðsettar á Látrinum á Argjahamri.

Judofelagið og borðtennisfelagið hava hvør umleið 7 kappingar um árið í Havn. Ein umrøddur møguleiki fyri at skapa hesum ítróttagreinum betri umstøður er at útbygda høllin á Hálsi ognar sær máttur til judo og eini 8 borðtennisborð soleiðis at kappingar framyvir verða í høllini á Hálsi og at Ítróttaanlegg tryggjar at alt er klárt til hesar kappingar í góðum kørmum, meðan judo framyvir venjur í høllini á Argjahamri ella heldur fram í Eysturskúlanum og borðtennisfelagið á Látrinum á Argjahamri.

**Býarskipanar- og myndugleikaviðurskifti**
Høllin á Hálsi er  fevnd av øki D2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu seinast broytt 31. oktober 2013. Innan karmar av byggisamtyktini eru rúmir møguleikar fyri bygging í økinum. Í økinum eru ikki nøktandi parkingsviðurskifti og er tí neyðugt innan 2017 at fáa gjørt fleiri parkeringspláss.

**Samlaði kapasiteturin innan ítróttaranlegg og fleirnýtsluendamál**
Hallarkapasiturin í Tórshavnar kommunu er sum heild tepur, og greitt er, at við stóru menningini innan ymiskar ítróttagreinar er tørvur á útbygging av kapasitetinum, og tørvur er á fleiri hallartímum.
Verandi nýtslustig er høgt, samstundis eru Ítróttaranlegg í holt við at fara ígjøgnum og eftirmeta skipanina við atliti at tryggja sær, at optimal nýtsla er av tøka tilfeinginum, t.d. at í fleiri førum er ein heil høll avsett, men bert hálv høll verður brúkt; at tað kemur meir enn so fyri, at ikki verður boðað frá, tá ein høll ikki verður brúkt.

Samanlagt ræður Ítróttaranlegg yvir 16 hallum í kommununi antin alt døgnið ella eftir kl. 16 og í vikuskiftum. Talan er umleið 12.000 $m^2$. av hallum, skiftingarrúmum vm.

Um nevnda útbygging verður framd, verður *økt munandi* um tøku tíðirnar í skipanini til hondbólt, flogbólt, kurvabólt o.a.

**Rakstrarviðurskifti**
Øktir fermetrar í høllini fara at økja rakstrarútreiðslurnar hjá Ítróttaranleggum, men inntøkurnar av hallarleigu skuldu viga upp ímóti øktu útreiðslunum.

Samanumtikið verður mett, at nevnda íløga hevur høgt nyttuvirði og rímiligan kostnað í mun økta kapasitetin og gagnar ítróttinum, frítíðarendamálum og øðrum virksemi, sum er í høllini.

Skjøl eru viðfest.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at

- at heimila umsitingini at fara undir útboð av útbygging av høllini og parkeringsøki í sonevndum øvugtum útboði í eini heildararbeiðstøku innan fyri karmin á kr. 28,5 mió HVÚ u/mvg
  og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 25. november 2015:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um figgjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at verkætlanin verður víðkað til eisini at umfata hølir til judo og borðtennis, og at beina málið í býráðið.

**Ískoyti**
Sum uppfylging uppá viðgerðina í fíggjarnevndini 2. desember 2015 hevur umsitingin fyrireikað ískoytisverkætlan viðv. hølum serliga ætlað til judo og borðtennis, umframt ta útbygging, ið longu er viðgjørd og samtykt í nevndini.

Mett verður sannlíkt, at til ber at gera ein kjallara á uml. 400 m2 undir norðurskjøldrinum í útbygdu dupulthøllini fyri umleið 6,4 mio.kr. Kjallarin kann hýsa judo og borðtennis. Harumframt kann verða talan um onnur endamál, alt eftir nær og hvussu nógv hølini verða brúkt til høvuðsendamálini. Málið er, at judomáttur til ein vøll liggja frammi, uttan so at onkur heilt serligt orsøk ger seg galdandi. Á henda hátt fær judo fastar karmar kring virksemið.

Viðv. borðtennis verður møguleiki fyri, at fleiri borð kunnu standa fast frammi, og fær borðtennis soleiðis støðugar og framúr karmar. Ætlandi skal virksemið hjá hesum ítróttagreinunum kunna samvirka í ávísan mun. Sp/f HMP hevur projekterað verkætlanina á Hálsi higartil.

Nærri tekningar og útgreinað kostnaðmeting verður tøk mánadagin.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Sp/f HMP Consult við atliti til at liðugprojektera hallarútbyggingina, sum áður samtykt 25. november 2015, umframt við hesum ískoyti viðv. útbygging í kjallaranum og venda aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina við einum samráðingarúrsliti primo januar 2016.

**Mentamálanevndin 07. december 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Sp/f HMP-consult og er nú sáttmáli klárur um projektering. Sí hjálagt sáttmálauppskot, ið lýsir viðurskiftini nærri.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at staðfesta sáttmálauppskotið og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

## 11/16 Raksturin av Høllini á Stórheyggi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 218/15 | 15/03699-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 301/15 | 15/03699-2 |
| 3 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 236/15 | 15/03699-2 |
| 4 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 11/16 | 15/03699-2 |

**Málslýsing:**
Skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum heitir í telduposti dagfestur 27. september 2015 á Tórshavnar kommunu at átaka sær kostnaðin av rakstrinum av Høllini á Stórheyggi og svimjihylinum á Argjum. Skúlastýrið biður um, at høllin og svimjihylurin verða tikin úr rakstrinum hjá skúlanum í sambandi við fíggjarætlan 2016.

Høllin á Stórheyggi er partur av játtanini hjá Skúlanum á Fløtum konta 4117. Høllin er sostatt ikki eitt rakstrarstað, og tí er fermetratalið nýtt í útrokningini niðanfyri til raksturin av høllini.

| **fíggjarætlan 2016** | **Heimari,Ytri og høllin** | **pr. m$^2$** | **Høllin á Stórheyggi** |
|---|---|---|---|
| lønir til reingerð | 418.172,00 | 231,67 | 210.823,56 |
| olja | 142.000,00 | 78,67 | 71.590,03 |
| el | 57.000,00 | 31,58 | 28.736,84 |
| reinførisvørur | 18.000,00 | 9,97 | 9.074,79 |
| umvæling | 49.000,00 | 27,15 | 24.703,60 |
| **tilsamans** | **684.172,00** | | **344.928,82** |

Verður Høllin á Stórheyggi tikin úr rakstrinum hjá Skúlanum á Fløtum í 2016, eigur játtanin á 345.000 kr. at verða tikin úr 4117 Skúlin á Fløtum í uppskotinum til fíggjarætlan 2016.
Føstu inntøkurnar hjá Høllini á Stórheyggi eru 96.000 kr. um árið. Tað er leigan hjá Havnar Fimleikafelag, sum hevur sáttmála um at leiga høllina fyri 8.000 kr. um mánaðin.

Hølllin á Stórheyggi kann verða løgd undir Ítróttaranlegg, og játtan á 345.000 kr. eigur so at verða flutt á kontu 5717 Ítróttaranlegg.

Svimjihylurin er partur av bygninginum í Argja skúla, tí er torført at taka hann úr rakstrinum á bygninginum. Umframt svimjihylin í Argja skúla, er svimjihylur í Eysturskúlanum og í Kollafjarðar skúla. Raksturin á teimum svimjihylunum er í játtanini hjá ávikavist Eysturskúlanum og Kollafjarðar skúla. Í Eysturskúlanum er svimjihylurin eins og í Argja skúla í sjálvum skúlabygninginum, meðan tann í Kollafirði er í bygningi fyri seg.

Skipanin við svimjihylum í skúlum er sostatt tann, at svimjihylurin er partur av rakstrinum hjá skúlunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at frá 1. januar 2016 verður Høllin á Stórheyggi tikin úr rakstrinum hjá Skúlanum á Fløtum og flutt til Ítróttaranlegg, og at 345.000 kr. verða fluttar av 4117 Skúlin á Fløtum í uppskotinum til fíggjarætlan 2016 á 5717 Ítróttaranlegg.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla frá, at raksturin av svimjihylinum í Argja skúla verður tikin úr rakstrinum hjá Skúlanum á Fløtum.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen,  Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu:
Jan Christiansen.

# 12/16 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | | | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | | | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 m$^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 m$^2$ og 20.000 m$^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | |
|---|---|
| Matr.nr. 1099 | 14.660 m$^2$ |
| Matr.nr. 1100 | 15.280 m$^2$ |
| Matr.nr. 1102c | 5.879 m$^2$ |
| | |
| Tilsamans | 35.819 m$^2$ |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m$^2$ fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m$^2$ = 11.900 m$^2$ til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m$^2$.

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

# 13/16 Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2015 | 141/15 | 15/01465-2 |
| 2 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 87/15 | 15/01465-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 162/15 | 15/01465-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 124/15 | 15/01465-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 191/15 | 15/01465-2 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 155/15 | 15/01465-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 264/15 | 15/01465-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 24/16 | 15/01465-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 41/16 | 15/01465-2 |
| 10 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 13/16 | 15/01465-2 |

**Málslýsing**:
**Umsókn um langtíðarleigumál:**
Bústaðir, Føroya Bústaðarfelag, søkir kommununa um at kunna leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

Talan er um ein part av lonini, sum vendir móti Sjúrðargøtu/Tróndargøtu, umleið 1.440m² til samans, har ætlanin er at byggja lestraríbúðir.

Bústaðir ynskir at kunna leiga henda partin av bygninginum sum hann stendur, og ber Bústaðir allan kostnaðin av umbygging til íbúðirnar, bæði innan og uttanveggja, t.v.s. at Bústaðir ber allar útreiðslur til verkætlanina.

Bústaðir ynskir leigumál yvir 30 ár, har bústaðir átekur sær at umbyggja og viðlíkahalda lonina í sama tíðarskeiði.

Talan er um eina stóra verkætlan og metir Bústaðir tað vera rættast at lyfta umbyggingina í stigum. Bústaðir er til reiðar at luttaka í tí heildarætlan sum umfatar aðrar partar av skúlanum bæði tí ynskiligt er at fleiri leigubústaðir skulu gerast og tí, at umbyggingar og umvælingar fyri allan skúlan væntandi skulu gerast í einum, t.d. at skifta tak og at skipa uttanum økini.

Bústaðir vísir til fund við stjórn, har avtalað varð at seta ein arbeiðsbólk ið skal lýsa verkætlanina nærri, og skal arbeiðsbólkurin gera eitt tilmæli til stýrið hjá Bústøðum og til politisku skipanina.

Taks setir treytir um talan skal gerast um mvg-frítøku.
Síðani Bústaðir sendi kommununi umsóknina um leigumálið, hevur TAKS víst á, at um Bústaðir skal hava mvg. frítøku fyri umvæling av kommunuskúlanum, er neyðugt at Bústaðir eigur bygningin, tí TAKS krevur tinglýst veð í bygninginum fyri mvg. frítøkuna.

Bústaðir kannar um til ber at sleppa undan hesi reglu, men um undantak ikki fæst, søkir Bústaðir at keypa partin av Kommunuskúlanum fyri 1. kr. og fær kommunan tá forkeypsrætt, til ein frammanundan mettan prís.

Í løtuni ber tí ikki til at siga, um talan kann gerast um langtíðarleigumál ella um møguliga sølu við kommunalum forkeypsrætti.

Langtíðarleiga/Søla uttan alment útboð.
Sambært svarskrivi sum kommunan fekk frá Innlendismálaráðnum 11. apríl 2013, í samband við at kommunan søkti um loyvi til sølu av lendi til Bústaðir framgongur, at Bústaðir skal javnsetast við almennan mynduleika, og at til ber at selja ognir til Bústaðir uttan at ognirnar verða boðnar alment út.

Onnur formlig viðurskifti:
Møguligt søla/leiga av parti av kommunuskúlanum krevur at hesin parturin verður frámatrikuleraður, og kann tí gerast talan um at kommunan selir umsókta partin av skúlanum, og langtíðar leigar undirlendið.

Sambært samrøðu við Umhvørvisstovuna framgongur, at til ber at frámatrikulerað part av skúlanum til nýtt matrikul nr. treytað av brunagóðkenning. ( Krøv um brandmúr v.m )

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri fíggjarnevnd til umrøðu og møguliga støðutakan.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Málið umrøtt.

**Býráðið fyri læstum hurðum 21. mai 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Endalig avkláring uppá mvg. spurningin fyriliggur ikki enn, men væntar Bústaðir at ein loysn finst fyri hesum og arbeiðir Bústaðir við upprunaligu loysnini sum umfatar leigu.

Eitt langtíðarleigumál viðførir, at neyðugt verður at frámatrikulera partin, sum Bústaðir leigar til nýtt matrikul nr.

Um kommunan leigar partar av skúlanum út til Bústaðir, verður neyðugt at tryggja, at Bústaðir rindar allar útreiðslur, sum leigumálið hevur við sær, herundir eisini tær útreiðslur, sum standast av teimum møguligu broytingum av bygninginum, sum verða kravdar í sambandi við frámatrikuleringina. Her verður hugsað um brunamúrar v.m.

Eitt møguligt leigumál skal verða uttan útreiðslur fyri kommununa.

Løgdeildin hevur gjørt eitt uppskot til leigumál, sí skjal nr. 15/01465 – 5

Talan er um 30 ára leigumál við møguleika fyri framlongjan í 10 ár. Tá ið leigumálið gongur út, hevur kommunan rætt til at yvirtaka innrættaðu hølini fyri 75 % av mettum virði. Leigugjaldið er ásett til kr. 1.000 árliga.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at leiga Bústaðir uml. 1.440m² av kommunuskúlanum sambært uppskot leigusáttmála, sí skjal nr. 15/01465 – 5.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein taka undir við at leiga Bústaðir uml. 1.440 m² i einum 30 ára leigusáttmála, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, um at taka Kommunuskúlan niður og at tingast við Bústaðir um at byggja nýggjar lestraríbúðir á staðnum, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti.**
Greitt verður frá málinum. Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Kunnað varð um málið, sum verður beint í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Frágreiðing og møguligt tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:** Tórshavnar kommuna og Bústaðir eru komin ásamt um treytirnar í einari rammuavtalu fyri verkætlanina at gera Kommunuskúlan til lestrarbústaðir, ið verður løgd fyri fíggjarnevndina og býráðið at góðkenna.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna fyriliggjandi uppskot til rammuavtalu, j.nr. 15/01465-16 og 15/01465-17.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við tilmælinum og játta kr. 400.000 kr av konto 1313 visandi til § 8 í rammuavtaluni og mæla býráðnum til at góðkenna rammuavtaluna.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu
Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu:
Jákup Dam

# 14/16 Grundstykkjalistin (reglugerð fyri bíðilistan til grundstykki)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 132/15 | 15/01696-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 154/15 | 15/01696-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 304/15 | 15/01696-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 10/16 | 15/01696-1 |
| 5 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 14/16 | 15/01696-1 |

**Málslýsing**:
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Arbeitt hevur verið víðari við málinum út frá teimum meginreglum, sum vóru nevndar í uppritinum(sí notat í málinum) og teimum viðurskiftum annars, sum vóru umrødd á fíggjarnevndar fundinum tann 10. juni 2015.

Verandi skipan við bíðilista gevur neyvan eina rættvísandi mynd av tørvinum til grundstykkir og kann geva eina fatan av, at tað lønar seg ikki at skriva seg upp, tí bíðitíðin er so long. Hetta kann meira styggja enn eggja fólki at flyta til Tórshavnar kommunu.

Tí verður mælt til at fara frá verandi skipan við bíðilista til eina skipan við tilmelding, har fólk kunnu skriva seg upp til útlutan, so hvørt sum einstøku útstykkingarnar verða settar í verk. Tað verður gjørt á tann hátt, at tá ein útstykking er neyvt lýst við tekningum, byggisamtykt og kostnaði, verður lýst alment í fjølmiðlum at nú kunnu tey, ið hava áhuga í at ogna sær slíka ogn melda seg til.
Gongdin hevði verið øvugt av gongdini í dag. Tey, ið veruligu hava tørv á eini ogn, høvdu vent sær til kommununa og melda til, og øll høvdu havt sama møguleika. Mett verður, at tað fyri borgaran hevði kenst sum ein rættvísari og meira gjøgnumskygd skipan.

**Høvuðspunkt í sambandi við umskipan av útlutan av grundstykkjum:**
- Verandi skipan við bíðilista verður avtikin
- Ístaðin verður ein skipan sett í verk, har fólk kunnu skriva seg upp til útlutan, so hvørt sum útstykkingar verða settar í verk
- Øll kunnu fáa tillutað grundstykki, eisini fólk, sum ikki búgva í Tórshavnar kommunu, men ein treyt verður sett um, at hesi flyta til kommununa.
- Ein ávísur partur av øllum framtíðar útstykkingum skal leggjast av til fólk við serligum tørvi og fólk, ið hava tørv á at skifta til minni ella størri

bústað. Serligar ásetingar verða settar í verk fyri hesa skipan og býtislýkil í reglugerð, sum verður løgd fyri fíggjarnevndina aftur. Ein treyt vil verða at tey, sum ynskja at skifta frá verandi bústaði skulu selja hesa ogn.

**Tilmæli:**

**Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á Snarskivuni mæla til at, fíggjarnevndin samtykkir at,**

- verandi reglugerð fyri bíðilista til grundstykki og íbúðir verður avtikin, tá grundstykkini á Kongavarða eru útlutaði.
- Lýst verður alment við at bíðilistin er undir avvikling og nýggj skipan kemur ístaðin.
- kunningarskriv verður sent øllum á bíðilistanum, har greitt verður frá, at skipanin verður avtikin og hvør skipan kemur í staðin.
  tilmæli verður lagt fyri fíggjarnevndina, har mælt verður til at samtykkja nýggja reglugerð fyri tillutan av grundstykkjum, sum tekur støði í høvuðspunktunum omanfyri við eini tilmeldingarskipan, og har serligur tørvur og býtislykil fyri umbýti eru ásett.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu í málinum, tá ið uppskot til nýggja reglugerð fyriliggur.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við nýggjari reglugerð fyri tillutan av grundstykkjum, sum tekur støði í høvuðspunktunum omanfyri við eini tilmeldingarskipan, og har serligur tørvur og býtislykil fyri umbýti eru ásett.

Mett verður, at besta loysnin er at býta arbeiðið upp í tveir partar, har fyrri parturin snýr seg um at avtaka verandi grundstykkjalista, og at ein tilmeldingarskipan verður sett í gildi ístaðin. Seinni parturin snýr seg um at gera broytingar í reglunum fyri tillutan av fastari ogn.

Mælt verður til at nýta Karlamagnusarbreyt (14/4565), Kongavarða og stykkini í Kollafirði (15/00969), til at avvikla og avtaka grundstykkjalistan, soleiðis at øll á listunum hava fingið grundstykki boðið í Tórshavnar kommunu.

Eftir hetta er tørvurin betri kendur, og arbeiðið við at áseta ein møguligan býtislykil og at gera broytingar annars í reglunum fyri tillutan av fastari ogn kann tillagast til tær royndir vit gera okkum í sambandi við hesa seinastu útbjóðing eftir bíðilistanum. Tá er eftirspurningurin betri kendur, og nýggju reglurnar kunnu lagast til í mun til hendan.

Mælt verður til at gera broytingarnar í hesi raðfylgju:

- grundstykkini á Karlamagnusarbreyt, Kongavarða og Kollafirði verða boðin teimum, sum standa á verandi grundstykkjalista og eftir galdandi reglum fyri tillutan
- øll tey sum standa á listanum fáa at vita at hetta er seinasta tilboð tey fáa eftir verandi lista. At listin eftirfylgjandi verður avtikin og at ein tilmeldingarskipan verður sett í staðin, har øll kunnu melda til eina útstykking.
- kunningarskriv verður sent øllum á bíðilistanum, har greitt verður frá, at skipanin verður avtikin og at ein tilmeldingar skipan kemur í staðin.
- lýst verður alment við at bíðilistin er undir avvikling og nýggj tilmeldingarskipan kemur ístaðin.
- verandi reglur í reglugerðini fyri bíðilista til grundstykki og íbúðir, sum snúgva seg um sjálvan bíðilistan verða strikaðar, tá grundstykkini á Kongavarða eru boðin teimum, sum standa á verandi listum

Hetta er fyrri partur av broytingunum, sum bara snýr seg um at avtaka sjálvan listan og reglurnar um bíðilistan.

Eftir hetta kann annar partur av broytingunum fara í gongd og sum snýr seg um arbeiðið við at broyta reglurnar fyri tillutan við býtislykli v.m., soleiðis sum tilskila omanfyri.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á Snarskivuni mæla til at gera broytingarnar í tveimum pørtum, og at taka undir við fyrra parti av broytingunum, sum lýst omanfyri og sum bara snýr seg um at avtaka sjálvan bíðilistan og reglurnar um bíðilistan.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge vísir á sína støðu til fundin 2. desember 2015.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi
Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu:
Jógvan Arge og Jákup Dam

## 15/16 Parkeringspolitikkur í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.11.2014 | 266/14 | 14/04932-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 137/15 | 14/04932-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 25.11.2015 | 152/15 | 14/04932-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 313/15 | 14/04932-1 |
| 5 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 247/15 | 14/04932-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 10/16 | 14/04932-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 16/16 | 14/04932-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 15/16 | 14/04932-1 |

**Málslýsing:**
Parkeringsviðurskiftini í innara parti av Havnini hava verið til viðgerðar fleiri ferðir í faknevndum. Eisini hava avgerðir verið tiknar við støði í parkeringssonuni, har tað hevur verið lagt upp til at tíðarskeiðið fyri parkering er longri, alsamt størri fjarstøðan er frá innara parti av býnum.

Víst verður til mál nr. 2009-1547, 2008-3152 og 2010-0323 um parkeringsviðurskifti sum heild í miðbýnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Víst verður til ferðslulógina.

**Upplýsingar frá umsitingini.**
Umsitingin hevur í framhaldi av mál nr. 2009-1547 gjørt uppskot til p-loyvir til borgarar í innara parti av Havnini, sum ikki hava møguleika at fáa staðsett p-pláss inni á egnari ogn.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**
Víst verður til mál nr. 2009-1547, 2008-3152 og 2010-0323 um parkeringsviðurskifti sum heild í miðbýnum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**

Víst verður til samskifti við IMR og seinni VMR sambært mál nr. 2009-1547.

Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tekniska nevnd 5. november 2014:** Umsitingin greiddi frá málinum. Nevndin samtykti, at umsitingin arbeiðir víðari við tilráðing nr. 2 í framløguni hjá umsitingini j.nr. 14/04932-2, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við tilráðing nr. 2 sambært nevndarsamtykt frá 5. november 2014 (j. nr. 14/03209-2 og ikki 14/04932-2 sum tilskilað omanfyri).

Uppskotið í tilráðingini tekur støði í, at umsøkjarin skal lúka hesar treytir:

1) Umsøkjarin skal vera privatpersónur
2) Umsøkjarin skal eiga bústað í Miðbýnum (innan fyri grundøki 2 og inni í verandi sonu-skipan)
3) Umsøkjarin hevur ikki parkeringsmøguleikar inni á egnari ogn
4) Umsøkjarin skal vera eigari av bilinum, sum søkir parkeringsloyvi og bilurin skal vera skrásettur á bústaðnum
5) Bilurin skal vera max 3500 kg
6) Tað verður bert 1 p-loyvi útskrivað pr. bústað/matrikul

Sambært metingum hjá umsitingini kemur samlaða talið av slíkum loyvum at verða uml. 66, men mett verður, at neyvari kanningar mugu gerast fyri at kunna staðfesta ítøkiligari nær ein borgari ikki hevur møguleika at útvega egið p-pláss á egnari ogn. Møguliga er neyðugt at staðfesta eitt ástøði fyri kostnaðarstøðið fyri eitt egið p-pláss.

Fyri at kunna fyrireika framhaldandi arbeiði at bjóða einstøkum borgarum í innara parti av býnum tilboð um parkering á kommunalum vegaøki, krevst at neyðug orka verður sett av til hetta.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Mett verður at tað gerst neyðugt at seta einar kr. 80.000,- til kr.100.000,- av til eksterna ráðgeving fyri arbeiðið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá verandi tilfari.

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Kunnað varð um málið.
Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Á fundinum í teknisku nevnd 4. november 2015, var málið um parkeringspolitikk framlagt til kunningar, og hevur umsitingin í hesum sambandi sent tilfar til nevndarlimir til støðutakan á fundinum.

**Tekniska nevnd 25. november 2015:** Samtykt at taka undir við uppskotinum til parkeringspolitikk, dagf. 19. november 2015 og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Nú parkeringspolitikkurin er samtyktur av býráðnum, er eftir at seta átøkini í politikkinum í verk.

Tekniska fyrisitingin metir at tað er neyðugt at seta ein samskipara í tíðaravmarkað starv til at fyrireika og íverkseta átøkini í parkeringspolitikkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til játta kr. 500.000 av konto 7610 Parkeringsskipanin at seta samskipara í tíðaravmarkað starv og beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddi
Jan Christiansen

# 16/16 Jón Gunnarsson vegna Føroyskt Íslenskt Rossafelag : Umsókn um TK kann asfaltera vegin niðan til økið undir Kráarheyggi í Havnardali (2003-0301)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 22/16 | 16/00128-28 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 43/16 | 16/00128-28 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 16/16 | 16/00128-28 |

**Málslýsing:**
**Uppdyrkingarvegur til Føroyskt Íslendskt Rossafelag**
**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Sambært asfaltætlanini fyri árið 2004 er vegurin ikki tikin við, og er ynski um at fáa vegin asfalteraðan sambært skrivi, dagfest 3. februar 2003, frá Jón Gunnarsyni.

Í skrivi frá umsitingini er greitt frá, at áheitanin ikki kann verða gingin á møti orsakað av, at vegurin ikki er kommunalur.

Formaðurin í teknisku nevndini ynskir, at nevndin tekur støðu til, um kommunan skal gera neyðugar ábøtur, áðrenn farið verður undir asfalteringina.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Tekniska deild hevur gjørt leysliga kostnaðarmeting til at gera arbeiðiðliðugt.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004**: Samtykt at játta kr. 400.000,00 av reguleringskontoini til ábøtur og asfaltering av vegnum og at beina málið í teknisku nevnd til kunningar.

**Tekniska nevnd 22. juni 2004**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur lati gera kostnaðarætlan av at asfaltera økið kring fjósið hjá felagnum Føroyskt Íslendskt Rossafelag. Økið, sum felag ynskja at fáa asfaltera er um 1500m2. Økið er ikki planerað og sostatt í løtnuni ikki klárt til asfaltering. Kostnaður fyri samlaða asfaltarbeiðið er mettur til:

1) Planering ca 60.000,-
2) Asfaltering ca 300.000,-

**Tilmæli.**

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

## 17/16 Asfaltering av parti av atkomuvegnum til virksemið í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 20/16 | 16/00129-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 44/16 | 16/00129-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 17/16 | 16/00129-1 |

**Málslýsing:**
**Asfaltering av parti av atkomuvegnum til virksemið í Havnardali**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sum partur av stuðli til frítíðarvirkesmið í Havnadali, er neyðugt at dagføra partar av atkomuvegnum. Umframt at kommunan hevur ætlanir um at lata stuðul til Føroya Ríðingafelag og Føroyskt Íslendskt Rossafelag, sum bjóða borgarum og øðrum ymisk frítíðartilboð so sumdjóradagar v.m, er neyðugt, at peningur eisini verður játtaður til partar av sjálvum atkomuvegnum til økið.

Vegastrekkið, talan er um er ca 350 m til longdar, og samlaða víddin er uml. 1675 m2. Við einum dagførdum slitlagi verður kostnaðurin fyri asfaltarbeiðið uml. 210.000,-.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

## 18/16 Føroya Ríðingarfelag : Umsókn um at fáa vegin yvir til ríðihøllina og økið framman fyri fjósini asfalterað (2008-3427)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 21/16 | 15/04662-14 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 42/16 | 15/04662-14 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 18/16 | 15/04662-14 |

**Málslýsing:**
**Viðv. asfaltering á økinum hjá Føroya Ríðingarfelag**
Føroya Ríðingarfelag heitti í skrivi, dagfest 2. juli 2008, á Tórshavnar kommunu um at skipa fyri, at vegurin yvir til ríðihøllina og framman fyri nýbygdu fjósini hjá Føroya Ríðingarfelag í Havnardali verður asfalteraður.

Í skrivinum sigur felagið, at lovað varð, tá asfalterað varð í Havnardali, at kommunan eisini skuldi asfaltera nevnda veg, men avrátt varð at bíða við asfalteringini, so leingi arbeitt varð við stórum og tungum maskinum á økinum. Nú eru øll arbeiði við stórum maskinum á økinum liðug, og tí  heitir Føroya Ríðingarfelag á kommununa um at asfaltera restina av økinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 150.000 av kontu 5366 Stuðul annars.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Útsett.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:**

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:**
Eftir áheitan greiddi trivnaðarstjórin frá leigusáttmálanum við Føroya Ríðingarfelag og skyldum, sum mett verður, at kommunan hevur um asfalt sum leigugjald, ið Barna- og ungdómsdeildin er biðin um at avgreiða. Vísandi til ivamál, sum nevndarlimir hava um sáttmálaskyldurnar, ynskir nevndin málið lagt fyri nevndina til næsta fund.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Málið varð umrøtt og útsett.

**Ískoyti:**
Til tess at halda sínar skyldur sbr. § 4 í sáttmálanum mælir borgarstjórin til at játta 450.000 kr. av konto 20910.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**

Umsitingin hevur lati gera kostnaðarætlan av at asfaltera økið kring fjósið hjá Føroya Ríðingafelag.
Økið, sum Føroya Ríðingarfelag ynskja at fáa asfaltera nú er um ca. 1000m2 til støddar svarandi til eina íløgu álj. kr. 200.000

| | Blað nr.: 48 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. januar 2016 | Formansins merki: |

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

# 19/16 Eigarafelagið Berjabrekka 1 og Eigarafelagið Berjabrekka 2 : Umsókn um yvirtøku av vegi og gongubreyt inni á bústaðarøkinum á Berjabrekku 1 og 2 (2010-0819)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 45/16 | 14/00356-37 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 11/16 | 14/00356-37 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 19/16 | 14/00356-37 |

**Umsókn um at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin og gongubreyt inni á bústaðarøkinum á Berjabrekku 1 og 2**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigarafeløgini fyri 1. og 2. byggistig á Berjabrekku søkja um, at kommunan formliga yvirtekur vegin og gongubreyt inni á teirra øki. Somuleiðis verður søkt um, at kommunan frameftir viðlíkaheldur vegirnar í síni heild, eisini viðvíkjandi kavarudding.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgdeildini mælir til at málið verður beint í viðkomandi faknevnd(ir) til ummælis.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt ikki at ganga umsøknini á møti, vísandi til at vegaøkið inngongur í útrokningargrundarlagið fyri byggiloyvi til byggingina á Berjabrekku. Vegaøkið er at skilja sum partur av samlaða økinum og kann sostatt ikki skiljast frá nú, av tí at alt økið er roknað við, tá ið útstykkingarætlanin varð góðkend.

**Ískoyti:**
Eftirfylgjandi hava nevndu eigarafeløg sett fram ynski um at kommunan átekur sær at asfaltera vegirnar inni á Berjabrekku. Vegirnir eru í ógvuliga ringum standi. Á fundi hjá borgarstjóranum framførdu formenninir fyri eigarafeløgunum Berjabrekka 1 og 2 síni sjónarmið og hareftir varð ástaðarfundur hildin, so at kommunan kundi fáa sjón fyri søgn. Eigarafeløgini førdu fram, at vanligir skattgjaldarar ikki skuldu havt ábyrgd fyri at asfaltera veg, har almenningurin ferðast og serliga í hesum føri, tá ið kommunan sjálv stóð fyri útstykkingini. Harumframt søgdu formenninir seg ivast í hvør átti vegin. Tað er tó, sambært løgdeildini, ongin ivi um hvør eigur vegin, j.nr. 2010-0819/10. Sí eisini j. nr. 2000-2712 Yvirtøka av privatum vegum.

**Fíggjarligt:**
Sum avtalað á ástaðarfundinum, hevur umsitingin gjørt eina kostnaðarmeting, har asfaltering av øllum vegunum kostar yvir eina millión. Umsitingin hevur eisini gjørt eina aðra kostnaðarmeting, har kostnaðurin kann haldast á uml. kr. 600.000. Sí j.nr. 2010-0819/8.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at ganga umbønini á møti, vísandi til at vegaøkið er privat ogn og annars við somu grundgevingunum sum fíggjarnevndin 16. juni 2010.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Eigarafelagið hevur aftur vent sær til kommununa við ynski um at fáa loyst viðurskiftini viðvíkjandi dagføring av vegunum inni á økinum á Berjabrekku.

Víst var millum annað á, at stórar lagdir eru í vegnum og at innkoyringin til Sundsvegin treingir til at dagførast.

Forkvinnan ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at asfaltera Berjabrekku, men av tí at asfaltætlanin er samtykt, er ikki fíggjarligt rúm fyri arbeiðinum í ár. Heitt verður tí á fíggjarnevndina um at útvega fígging.

Nevndin samtykti eisini at beina málið í fíggjarnevndina, um at virka fyri at kommunan yvirtekur allar privatar vegir fyri á tann hátt at kunna røkja allar almennar vegir eins.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum og einari ætlan um at flokka allar vegir í kommununi við tí fyri eyga at útgreina leistin fyri møguligari kommunalari yvirtøku av vegunum.

Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen, samtykti at málið verður tikið upp í sambandi við viðgerð av málinum um yvirtøku av privatum vegum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 22. mai 2012, har samtykt varð at asfaltera Berjabrekku og at arbeiðið verður gjørt í ár og fíggjað av játtanini til asfaltering. Somuleiðis vísir hon til samtyktina um at beina málið í fíggjarnevndina um at virka fyri at kommunan yvirtekur allar privatar vegir fyri á tann hátt at kunna røkja allar almennar vegir eins.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðið 16. september 2013:** Málið beint í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at heita á umsitingina um at gera eina reglugerð fyri kommunala luttøku í kostnaðinum at asfaltera privatar vegir.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 12. juni 2013.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini.

**Ískoyti:**
Ì framhaldi av niðurstøðunum í fíggjarnevndini 23. mai 2013, umframt í teknisku nevnd 12. juni 2013 og 24. oktober 2013, skal fíggjarnevndin taka støðu til asfaltering á Berjabrekku.

Sambært metingum, ið gjørdar vóru í sambandi við ástaðarfund við umboð í nevndini frá eigarafelagnum, er umsitingin komin fram til at kostnaðurin fyri asfaltering kann gerast eftir tveimum uppskotum. Víst verður annars til skjal nr. 14/00356-36 í málinum.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Tað eina uppskotið tekur støði í, at ein partur av høvuðsvegnum, har mest ferðsla er í Berjabrekku, verður asfalteraður frá Hitamiðstøðini til hús nr. 133/69. Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið verður mettur til ca. kr. 220.000,-. Hitt uppskotið er eitt sindur meiri umfatandi og fevnir um asfaltarbeiði fyri allar vegir og parkeringsøki, og verður hetta mett til at kosta ca. 1,55 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

## 20/16 Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.02.2015 | 30/15 | 15/00485-33 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2015 | 38/15 | 15/00485-33 |
| 3 Tekniska nevnd | 02.09.2015 | 82/15 | 15/00485-33 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 206/15 | 15/00485-33 |
| 5 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 153/15 | 15/00485-33 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 280/15 | 15/00485-33 |
| 7 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 4/16 | 15/00485-33 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 25/16 | 15/00485-33 |
| 9 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 20/16 | 15/00485-33 |

**Málslýsing**:
Ráðgevi er biðin um at gera eitt projekt um at umskipa Velbastaðvegin frá Akranesngøtu og oman til bygningin hjá SEV við Sandá.

Projektið verður framlagt á fundinum.

Møguligt tilmæli kemur til fundin.

**Tekniska nevnd 3. desember 2002:** Nevndin samtykti at fara undir at bjóða arbeiðið út beinanvegin í innbodnari lisitatión, og at tilboð verður at leggja fyri nevndina aftur saman við tilmæli.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur saman við ráðgeva fram projekt við kostnaðarmeting og tíðarætlan. Entreprisumarkið er frá vegnum við Sandá (við uttasta part av gamla Velbastaðvegnum) og oman til Slættanesgøtu.

Arbeiðið at umleggja Velbastaðvegin við Krossin umfatar stórt veitingararbeiði, og er tað ein fortreyt, at farast má undir annan partin, ið er frá Slættanesgøtu oman til vegamótið til ringvegin.

Sum partur í at fíggja projektið, er møguleiki fyri at selja partar av ognini. matr. nr. 1090, Tórshavn, sambært uppskoti, ið umsitingin hevur latið gera (j. nr. 200202700/6).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður undir við uppskotinum (j. nr. 200202700/5).

**Tekniska nevnd 25. februar 2003:** Nevndin samtykti at senda málið til hoyringar.

Nevndin samtykti eisini at bíða við útbjóðingini, til fígging er fingin til vega, og at ein heildarætlan fyri økið fyriliggur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen og Jógvan Arge, samtykti at heita á teknisku nevnd um at raðfesta projektið frammaliga.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Schumann Hjaltalin, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 25. februar 2003.

**Tekniska nevnd 12. august 2003:** Nevndin samtykti, at projektið verður víðkað til at umfata allan Velbastaðvegin frá ”fa. Bilfríðkan” til ”við Sandá”, at leggja fyri nevndina aftur. Vegurin verður gjørdur bert við gongubreyt á ovaru síðu. Atkoma til møguliga útstykking á matr. nr. 1090 kann verða frá verandi vegi, sum fyribilsloysn.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt hoyring í málinum við íbúgvar og virkir í umráðnum fram við Velbastaðvegin, sí j. nr. 200202700/9.

Vísandi til broytta byggisamtykt fyri økið sunnan fyri p/f Nomatek, so hevur plandeildin lagt av eitt øki til at selja sum grundøki.

Umsitingin hevur gjørt uppskot um makaskifti millum ognina hjá TK, matr.nr. 1090, og ognina hjá Edith Holm, matr. nr. 1091. Víst verður til notat og plantekning, j. nr. 200202700/6. Hetta fyri at fáa markið millum ognirnar at ganga meira beint niðan í landsvegin. Stykkið er uml. 5279 m².

Sp/f Lodd hevur søkt um keypa økið vestan fyri 1087c, vísandi til umsókn og nevndarsamtykt sí j. nr. 200003058/1 og 9.

Sp/f Annfinn Debess hevur søkt um keypa ella leiga økið, matr. nr. 1087b sunnan- vestan fyri 1087c, vísandi til umsókn og nevndarsamtykt sí j. nr. 200002232/1 og 8.

Umsitingin hevur gjørt eina plantekning nr. 2 og 3, sí j. nr. 200202700/18, sum vísir uppskot til atkomuveg til vinnistykki hjá sp/f Lodd og sp/f Annfinn Debess. Uppskotið tekur støðið í, at ein geiri uppá 3,5 m inni á økinum hjá sp/f Annfinn Debess, og ein geiri uppá 3,5 m og ein radios 5 verður at nýta til atkomuveg. 74 fermetrar frá sp/f Annfinn Debess og 88 fermetrar sp/f Lodd verða nýttir til atkomuvegin.

P/f Landsbyggifelagið er í ferð við at gera detailprojektið liðugt sambært teknisku nevnd 12. august 2003. Miðað verður eftir at fáa projektið liðugt til fyrst í juli mánað. Projektið saman við eini samlaðari kostnaðarmeting verður at leggja fyri teknisku nevnd fyrst í juli mánað.

Ein fyribils kostnaðarmeting áljóðandi kr. 7. mió. er gjørd av ráðgeva fyri sjálvt arbeiðið uttan MVG, vatn- og gøtuljós, projektering og óvæntaðar útreiðslur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 11. mai 2004:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina:

<u>at</u> gera gerðabýti millum ognirnar matr. nr. 1090 hjá Tórshavnar kommunu og matr. nr. 1091 hjá Edith Holm. Sambært notat j.nr. 200202700/6.
<u>at</u> grundstykkið oman Sandá íalt 1326 m² verður selt sum vinnustykki. Sambært plantekning 2 og 3.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

- Vísandi til nevndarsamtykt í teknisku nevnd 12. august 2003, hevur umsitingin latið gjørt uppskot til ráðgevingaravalu við P/F Landsbyggifelagið, sí j. nr. 200401352/2, í sambandi við at gera eitt fullfíggjað vegaprojekt frá ”fa. Bilfríðkan” og út til vegin ”við Sandá”.

Fíggjarkarmurin fyri samlaðu verkætlanina er, alt íróknað, uml. 9,62 mill., tó u/MVG. Samlaða gjaldið fyri veitingar LBF´s verður kr. 980.000,-, sum er 11,5 % av 8,5 mill, sí kostnaðarmeting hjá LBF sí j.nr. 200401351/2, treytað av at tíðarætlanin verður fylgd.

Víst verður til uppskot til ráðgevingaravtalu, j. nr. 200401352/2 fyri at síggja uppbýtið fyri samlaðu ráðgevingina. Eisini verður víst til kostnaðarmeting, j. nr. 200401351/2.

Umsitingin biður í hesum sambandi um fígging til projekteringina áljóðandi kr. 770.000,- u/MVG.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játtaðar verða kr. 818.125,-, sum er kr. 770.000,- v/6,25% MVG.

**Tekniska nevnd 8. juni 2004:** Nevndin samtykti at bjóða projekteringina út.

Forkvinnan ynskir at fáa viðgjørt málið um umskipan av Velbastaðvegnum. Víst verður m.a. á, at tað er umráðandi at fáa sett gongd á dagføringina, tí umleið 40 fyritøkur á hesum strekki, sum allar hava stóran tørv fyri at fáa til- og frákoyringarviðurskiftini í rættlag. Víst verður eisini til broytt ferðslumynstur, eftir at brúgvin um Sandá verður tikin í nýtslu.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Eingin peningur er settur av til arbeiðið. Tað fyriliggur eingin kostnaðarmeting av uppskotinum um vegagerðina.

**Tekniska nevnd 11. februar 2015:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 100.000,- til projektuppskot við dagførdari kostnaðarmeting, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Tekniska umsitingin kemur við tilmæli um fígging av teimum kr. 100.000 til fundin.

**Fíggjarnevnd 18. februar 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd. Arbeiðið verður fíggjað av rakstrinum á tekniska økinum og lagt fyri aftur til politiska støðutakan á fyrstkomandi fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur heitt á LBF um at gera eina dagførda kostnaðarmeting av vegastrekkinum frá Ringvegnum og út til Nomatek. Kostnaðarmetingin tekur støði í einum 6,5 m vegi við gongu- og súkklubreyt á báðum síðum á 3 m. Eisini er ein vegaøksl á 0,5 m á báðum síðum. Samlaða vegabreiddin er 13,5 m.

Umsitingin hevur eisini heitt á LBF um at gera eitt prosjektuppskot, sí TK j.nr. 15/00485-47.

**Fíggjarlig viðurskifti**
LBF hevur latið gjørt eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 13.689.710,- u/mvg, sí TK j. nr. 15/00485-45. Umsitingin hevur latið gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað prosjektering, eftirlit, keyp av lendi v.m. áljóðandi kr. 19.238.927,-, sí TK j. nr. 15/00485-46.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 20 mió. kr. av langtíðaríløgum innan vegir og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. september 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Ùtsett.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við tillutan av íløgujáttan fyri 2016 álj. 7 mió. kr. verður mett, at arbeiðið kann verða gjørt frá vegaíbindingini við ringvegin og niðaneftir. Arbeiðið fer at fevna um retablering av vegaøkinum framman fyri Velbastaðvegnum nr. 43-47 (sp/f El.fo, sp/f Gravsteinar og Hjálpirót umframt sp/f Bilrøkt) og niðan ímóti Slættanesgøtu. Vísast skal samstundis á, at tað er trupult at meta ítøkiliga hvssu langt komast kann fyri ásettu játtan.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd til víðari viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um dagføring av vegastrekkinum við rundkoyringina til Glyvursvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fara undir at fyrireika útbjóðingartilfar at leggja fyri nevndin aftur og at játta 2 mió. kr. av markaðum íløgum fyri 2016 (fyri Velbastaðvegin kto 8175) og at beina málið, um fíggjarnevnidna, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

# 21/16 Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 1298c, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 8/16 | 15/04058-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 26/16 | 15/04058-3 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 21/16 | 15/04058-3 |

**Málslýsing:**
Ánararnir av vegøkinum matr. nr. 1298c, Tórshavn, hava vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan yvirtekur privata vegøkið, sum er síðugøta til Mýrisnípuveg við atkomu til 2 grundøki.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 15/04058-2).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at umsókn teirra verður tikin uppaftur til nýggja viðgerð, tá vegøkið er asfalterað.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Nevndin samtykti, at kommunan yvirtekur vegin og at tað samstundis verður boðað umsøkjaranum frá, at hetta vegaøki verður at tinglýsa sum servituttur fyri vegatkomu galdandi fyri matr. nr. 1298 a og 1298b (Mýrisnípuvegur 1A og 1B). Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

# 22/16 Guttorm Mortensen : Umsókn vegna Sp/f Breytin um byggiloyvi til vinnubygning við íbúðum á matr. nr. 138g, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 11/16 | 15/00149-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 4/16 | 15/00149-18 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 22/16 | 15/00149-18 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn kemur tann 28. juni 2011 til kommununa frá omanfyri nevndu til ein vinnubygning við Karlamagnusarbreyt 4. Ætlaði bygningurin skuldi hava handil í veghædd, 4 íbúðir á 1. hædd og somuleiðis 4 íbúðir á 2. hædd.

Síðani hava verið nakrir fundir við umsøkjaran viðvíkjandi byggimøguleikum, og nú 7.des. 2011 kemur ein nakað broytt tekning til kommununa. Nú er talan um ein vinnubygning við handli í veghædd við einari hædd omaná við 4 íbúðum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðispartinum A3 í Serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Umsóknin umfatar ein handilsbygning og goymslu í veghædd og 4 íbúðir á 1. hædd.
Matr. nr. 138g er 307m² til víddar og bygningurin er tað sama.

Ætlaða byggingin er annars í samsvari við Serstøku byggisamtyktina fyri Karlamagnusarbreyt.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Kommunan ger asfalt- og uppmerkingararbeiðið fyri bilstøðlum.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar móttikið 7.des. 2011, j. nr. 2011-1605/3
Loftmynd av økinum
Cheklisti j. nr. 2011-1605/5
Serstaka byggisamtyktin fyri Karlamagnusarbreyt við skipanarætlan.
6 stk. glærur

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, - um tekningarnar annars lúka treytirnar í brunalógini- at geva umsøkjaranum byggiloyvi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sp/f Breytin fær so byggiloyvi til innsendu tekningarnar tann 7. feb. 2012. Men einki verður bygt.

Kommunan fær síðani umsókn um at endurnýggja byggiloyvið uml. trý ár seinni, og hetta verður játtað tann 3. juni 2015. Byggingin fer í gongd beinanvegin.

Tann 26. okt. 2015 fær kommunan ein teldupost frá Umhvørvisstovuni, har hon biður kommununa ummæla sundurbýti av handilshølinum í kjallarahæddini og tær fýra íbúðirnar omanfyri. (j. nr.15/04102)

Saman við postinum frá Umhvørvisstovuni vóru tekningar og her sást beinanvegin, at einki samsvar var ímillum hesar og tær sum byggiloyvi var til. Í íbúðarhæddini vóru bert smávegis broytingar, klæðingin ið var teknað vatnrætt var nú loddrætt og samsvar var als ikki við staðsetingina á hurðum og vindeygum. Men mesta broytingin var kortini í kjallarahæddini. (sí j. nr. 15/00149-20)

Eftir at umsitingin gjørdi vart við hesi viðurskifti hjá umsøkjaranum, sum eisini er ánari, hevur kommunan tann 7. des. 2015 fingið eina umsókn um broytingar í byggiloyvinum og um trý frávik.

Frávikini eru:
1) at tvær úthurðar eru útgangandi, út á parkeringsplássið.
2) at ein úthurð sum skuldi verða tætt inn frá vegnum, er flutt longur inn á miðjuna av bygninginum.
3) at hurðar til goymslurúmini, sum skuldi verða frá eini gongd inni í bygninginum, eru fluttar til at verða útifrá á eystara húsaenda frá kommunalum lendi.

**Skjøl:**
Byggiloyvi 7. feb. 2012 j. nr. 15/00149-9
Endurnýggja byggiloyvið j. nr. 15/00149-12
Umsókn um broytingar í byggiloyvinum við dagførdum tekningum við fráviksumbøn j. nr. 15/00149-17
Loft- og bygningsmynd j. nr. 15/00149-19
Munur millum givið byggiloyvi og tað ið bygt er j. nr. 15/00149-20

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til frávikini 1, 2 og 3 omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við atkomu frá kommunalum lendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Helena D. á Neystabø, samtykti at geva loyvi til frávikini og at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við atkomu frá kommunalum lendi.
Ein minniluti, Halla Samuelsen og Jákup Dam, taka ikki undir við at geva frávikini. Um frávik skal gevast, mugu ásetingarnar fyri alt økið broytast.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við at loyva umsøkjaranum atkomu frá kommunalum lendi.

Ein minniluti tekur undir við minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og vísir á, at um frávik skal gevast, skulu ásetingarnar fyri alt økið broytast.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu:
Elin Lindenskov, Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

# 23/16 Bent Kjærbæk : Áheitan um at broyta ásetingina fyri matr. nr. 90c,Hvítanes frá at verða plantuøki til B sethúsaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 19/16 | 15/04367-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 23/16 | 15/04367-2 |

**Málslýsing:**
Bent Kjærbæk søkir vegna foreldrini, Mia og Sunnleif Kjærbæk, sum eiga sethús á matr. nr. 90c, Hvítanes, um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Hvítanes soleiðis, at hetta verður broytt til byggiøki.

Ognin matr. nr. 90c, Hvítanes er 2.614 $m^2$ til støddar og er í byggisamtyktini fyri Hvítanes lutvíst í 4. grundumráði uml. 860 $m^2$, og restin løgd út til øki til plantu- og trævøkstur og E-øki til almennar stovnar uml. 1.750 $m^2$.

Sunnleif Kjærbæk fekk byggiloyvi til húsini frá Tórshavnar Uttanbíggja Kommunu tann 4. juni 1979, eftir at «Færøernes Overfredningsværn», tann 21. juli 1976, hevði givið loyvi til at byggja her (j.nr. 287/1978).

Í sambandi við mál um serstaka byggisamtykt fyri Hvítanes og innangarðs útskifting, sum biðin var um í 1962, var byggiloyvið hjá Sunnleif Kjærbæk eisini umrøtt (J.nr. 39[4] 1978). Hetta var í skrivi, dagf. 5.12.1979, frá 3-mannaráðnum fyri Tórshavnar uttanbýggja kommunu, Zacarias Vang, formaður, Kjartan Kristiansen, skrvari og Axel Simonsen, ráðslimur, sum ynsktu hetta á dagskrá fyri fyrst komandi fund. Hetta var orsakað av at ítróttarøkið við skúlan, sum var í vegin fyri at Sunnleif, kundi fáa byggiloyvi.

Byggiloyvið var útskrivað á matr. nr. 90, Hvítanes, áðrenn innangarðs útskiftingin var framd. Í 1987 var arbeiðið við útskiftingini sett í gongd. Sum úrslit av útskiftingini, var matr. nr. 90, sum byggiloyvi var útskrivað til, broytt til matr. nr. 90c, Hvítanes, og víddin av matriklinum økt tíðandi.

Umsitingin mælir til, at partarnir sum eru lagdur út til plantu- og trævøkstur og E- øki uml. 1.750 $m^2$ av matr. nr. 90c verður broytt til B-øki til sethúsabygging.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Hvítanes verður broytt soleiðis, at uml. 1.750 $m^2$ av matr. nr. 90c verður broytt frá øki til plantu- og trævøkstur og E-øki til B-øki til sethúsabygging sambært kortskjali, dagf. 09.12.2015.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

# 24/16 Sp/f Bilrøkt. Fyrispurningur um keyp av parti av matr. nr. 1070a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 27/16 | 14/00671-16 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 24/16 | 14/00671-16 |

## Málslýsing:

**Umsókn um keyp av øki.**

Sp/F Bilrøkt Fastogn, søkir um at kunna keypa uml. 850 m2, burtur av matr. nr. 1070a, Tórshavn, at leggja saman við egnari ogn matr. nr. 1076m, Tórshavn.

Felagið rekur bilverkstað og bilsølu á matr. nr. 1076 m, sum er til víddar 2.299 m2.
Samlaða víddin verður hereftir uml. 3.149 m2.

Endamálið við keypinum, er at fáa betri pláss til virksemið.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Viðmerking frá teknisku deild:**
Matrikul 1070a, sum søkt verður um, liggur í umráðisparti B3 og D1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Umleið 320 fermetrar liggja í B3 økinum og restin í D1 øki.

Víst verður til Glyvursvegin, kort j.nr. 2013-0141/5, sum kemur fram við ognini hjá Bilrøkt, víst verður eisini til hæddarmunin millum lidna gongu- og súkklubreyt og verandi lendi á ognini. Um kommunan selur part av matr. 1070a er umráðandi, at kommunan tryggjar sær rætt at seta skráa til møguliga planting, tá vegurin er liðugur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til, at S/p Bilrøkt Fastogn kann keypa umleið 320 fermetrar, sum liggja innan fyri B3 økið í almennu

byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ein partur av økinum, ið teir brúka at seta bilar á sum nú er, og at bíða at taka støðu til restina av økinum, til vegurin er liðugur út á Argir, treytað av góðkenning frá Innlendismálaráðnum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið við tilmæli um at selja umsøkjaranum lendið fyri 600 kr./m² við góðkenning frá Innlendismálaráðnum.

**Býráðið 26. juni 2013: Einmælt samtykt.**
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-0141.

**Ískoyti:**

Sp/f Bilrøkt søkti upprunaliga um at keypa 850m2.
Býráðið samtykti í fyrsta umfarið at selja umleið 320m2, fyri 600kr./m2, og at fylgja tilmælinum frá tekniska stjóra, um at bíða við at taka støðu til møguliga sølu av restini av umsøkta økinum, til vegurin er liðugur út á Argir.

Umhvørvisstovan avgreiddi frábýtið 19.09.2014. Tá ið frábýtið/sølan varð endaliga framd var økið uppmált til 296 m2.

Bilrøkt hevur í desember 2015, sent kommununi umsókn um at viðgera upprunaliga keypsmálið av nýggjum og søkir um at keypa írestandi 550 fermetrarnar.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

## 25/16 Regnvatnsleiðing úr Marknagili - projekt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.04.2015 | 59/15 | 15/01396-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 123/15 | 15/01396-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 95/15 | 15/01396-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 3/16 | 15/01396-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 18/16 | 15/01396-2 |
| 6 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 25/16 | 15/01396-2 |

**Málslýsing**:
Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum oman til Sandá fíggjað av langtíðar íløgum fyri kloakkir.

Í sambandi við arbeiðið at byggja skúladepilin í Marknagili, hevur Landsverk gjørt avtalu við kommununa, j. nr. 14/00941/188, um at leggja pening út til fíggingina av arbeiðinum til regnvatnsleiðing v.m.

Útbjóðingartilfarið til 1. byggistig til regnvatnsleiðing úr Marknagili oman í Sandá fór út 20. mars 2015. Avgjørt var at bjóða arbeiðið út í 2 byggistigum.

- Byggistig 1 er frá Landavegnum oman í Sandá
- Byggistig 2 er frá Marknagili til Landaveg.

Grundin til at avgjørt var at bjóða arbeiðið út í tveimum arbeiðstøkum er, at tað er ikki endaliga staðfest, hvussu vegurin verður gjørdur í sambandi við nýggja Vesturskúlan og best hevði verið um regnvatnsleiðingin verður løgd samstundis sum vegurin verður gjørdur.

Teir bjóðandi vóru:

- Articon
- J&K Contractors
- Plan v/Johannes Hellisdal
- Maskinkoyring
- P/F Tórhallur Hansen
- Andrias Berg

Lisitatión varð hildin 13.04.2015. Víst verður til lisitatiónsprotokoll j. nr. 15/01396-3. Av innkomnu tilboðunum var lægsta boðið frá p/f Tórhallur Hansen áljóðandi uml. 6,1 mió. kr.

Umsitingin kunnar um lisitatiónsúrslitið og tilmæli frá rágeva j.nr. 15/01396-4 og um hvussu farið verður undir arbeiðið.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2015:** Kunnað varð um málið. Nevndin samtykti at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Tórhalli Hansen áljóðandi kr. 6.163.000,- og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 21. mai 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í Íløguætlanini fyri 2016 eru avsettar kr. 10,8 mió. til kloakk í Marknagili.
Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum oman til Sandá fíggjað av langtíðar íløgum fyri kloakkir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 10,8 mió. av íløgukarmi fyri kloakkir 6875 - Kloakk í Marknagili - fyri fíggjarárið 2016 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

# 26/16 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á Karlamagnusarbreyt 17, matr. nr. 138u, Hoyvík hjá Kim Zachariasen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.09.2015 | 169/15 | 15/02222-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 15/16 | 15/02222-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 8/16 | 15/02222-5 |
| 4 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 26/16 | 15/02222-5 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn er komin frá Kim Zachariasen um at byggja ein vinnubygning við íbúðum á ovari hæddini. Søkt verður um frávik at byggja gongd/svala og yvirdekkað tak út um byggifeltið. Svalin og takið verða 1,31 m útum byggifeltið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Serstøk byggisamtykt fyri Karlamagnusarbreyt við skipar ætlan. Økið 3 stk. Nr 17.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Søkt verður um at byggja ein bygning í tveimun hæddum, har niðara hæddin verður gjørd til vinnuvirksemi og goymslurúm til íbúðirnar. Tað er ikki fastlagt, hvat slag av vinnuvirksemi, verður í niðaru hæddini í bygninginum. Í ovaru hæddini verða 4 íbúðir gjørdar. Trappur eru í miðjuni í bygninginum uppá ein svala.

Svalin verður gjørdur uttan fyri byggifeltið, sum verður næstan eftir allari longdini á bygninginum. Hesin svalin er gongin inn til íbúðirnar. Tak verður gjørt yvir svalan eftir allari longdini á bygninginum.

Breiddin á svalanum og takinum er 1,31 m og longdin er 31,90 m, sum er út um byggifeltið
Rennistokkur til takrennu er út um byggifelti.
Støddin á bygninginum er 334 $m^2$
Hæddin til svalan frá vegi er 3,55 m
Hæddin til hægsta punkt útvegg er 6 m
Hæddin til møn er 8,30 m, mest loyvda er 10,33 m
Tað, sum verður bygt út um byggifeltið, er út á felags parkeringsøkið fyri eigarnar á Karlamagnusarbreyt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Bónus, sum er granni, hevur fingið loyvi at gera parkeringspláss á eitt byggifelt. Mál nr. 2011-1381.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
At byggja svala og tak uttan um byggefeltið.
Breidd er 1,31 m út um byggifeltið.
Longd er 31,90 m.
Rennistokkur til takrennur er út um byggifeltið.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Hevur verið hjá teknisku deild viðv. kloakkering og býarskipanardeildini viðv. arkitekturi.
Viðm. frá býararkitektinum er:
1. Yvirornaða útsjóndin er nøktandi
2. Spurnartekin kann setast við at nýta timburklædning til ein tílíkan bygning. Helst hevði bygningurin tikið seg betur út við meiri býarkendum klædningi.

**Viðmerkingar frá øðrum**
Málið hevur ikki verið til hoyring hjá eigarunum, sum eiga felagsøkið.

**Skjøl**
15/02222-1 Umsókn
15/02222-3 Tekningar

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at ganga umsóknini á møti sum frávik. Vísandi til at bilar kunnu parkera undir svalan, sum er 3,55 m uppi yvir lendi. Og annars við teimum treytum sum umsitingin ásetir viðv. bygging og treytað av at eingi mótmælisskriv koma frá hoyring.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. september 2015:** Samtykt at ganga umsóknini á møti við treytum sum umsitingin setir og sum frávik í sambandi við at svalin gongur út um byggifeltið, vísandi til at bilar kunnu parkera undir svalanum, sum er uml. 3,55 m uppi yvir lendinum.

**Ískoyti:**
SP/F HK-Ognir hevur fingið byggiloyvi á matr.nr. 138 U, Hoyvík, til vinnubygning, har fýra sjálvstøðugar íbúðir eru i ovaru hæddini og við tilhoyrandi goymslurúmum í niðaru hæddini. Goymslurúmini eru í endanum á bygninginum, har hurðarnar eru til goymslurnar í eini gongd innanífrá. Nú søkir SP/F HK-Ognir um frávik við at hava hurðarnar til goymslurnar og teknikkrúm uttanífrá, soleiðis at hurðarnar til hvørja goymslu og teknikkrúm ganga út á kommunalt lendi frá endanum á bygninginum.

Byggifeltið endar, har bygningurin endar. SP/F HK-Ognir eigur ikki lendið framman fyri hesar ætlaðu goymsluhurðar. Lendið eigur Tórshavnar kommuna. Tí verður søkt um frávik, at SP/F HK-Ognir kunnu brúka lendið hjá kommununi at koma til inngongdina til goymslurúmini. Lendið er eitt frílendi.

**Skjøl**
15/02222-4 Umsókn og tekningar

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til umsóknina og at beina málið í fíggjarnevndina viðvíkjandi atkomu frá kommunalum lendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Samtykti at geva loyvi og at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við atkomu frá kommunalum lendi.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at loyva umsøkjaranum frávik viðvíkjandi atkomu frá kommunalum lendi.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Sigrun Mohr, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge, Jákup Dam og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu:
Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal

# 27/16 Broyting av byggisamtyktini fyri vinnuøkið á Hálsi og broyting av ásetingum fyri B4-øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 20/16 | 15/04659-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 27/16 | 15/04659-1 |

**Málslýsing:**
Vinnuøkið á Hálsi, avmarkað av R.C. Effersøes gøtu, Tjaldursvegi, Hoyvíksvegi og Eystara Ringvegi, er um at verða fult bygt. Í almennu byggisamtyktini er ein partur av økinum, vestur ímóti R.C. Effersøes gøtu, lagt sum C1-øki og restin av økinum er B4-øki.

Í ásetingunum í almennu byggisamtyktini er B4-øki ætlað til «vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi» og C1-øki er ætlað til «miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt».

Munurin á hesum ásetingum er t.d., at B4-øki ikki er ætlað til skrivstovuhølir og C1-øki ikki er ætlað til verkstaðir. Í dag eru skrivstovuhølir og verkstøð í báðum økjum.

Ein annar vansi við økinum er, at markið ímillum umráðispartarnar C1 og B4 liggur beint ígjøgnum økið, soleiðis at nakrar ognir liggja lutvíst í C1-øki og lutvíst í B4-øki.

M.a. av omanfyri nevndu grundum metir umsitingin tað er rættast, at leggja hesi bæði økini saman í B4 øki og leggja afturat í ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri B1-økir, at loyvt er at byggja skrivstovur.

**§ 11. Ásetingar fyri umráðispart B4 í 3. grundumráði**

1 Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.

2 Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 1000 $m^2$.

4 Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum.

5 Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.

6 Rúmmál á húsinum má ikki fara upp um 3 $m^3$ fyri hvønn $m^2$ av grundstykkinum.

7 Eingi hús og eingin húsalutur má vera hægri enn 10 m.

**§ 18. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1 í 3. grundumráði**

1 Umráðispartarnir verða í síni heild lagdir til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt.

2 Útstykking innan teir einstøku umráðispartarnar verður einans loyvd serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri umráðispartin.

3 Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.

4 Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8 .

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at almenna byggisamtyktin verður broytt soleiðis at:

C1-øki og B4-øki á Hálsi verður broytt soleiðis, at alt økið verður B4-øki sambært korti dagf. 15.12.2015

Ásetingarnar fyri B4-øki, kap. IV, §11, verður broytt soleiðis, at skrivstovur verður skoytt uppí stk. 1. *«Loyvt er einans at byggja hús til skrivstovur, vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.»*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

# 28/16 Broyting av almennu byggisamtyktini í sambandi við víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 27/14 | 14/04429-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.10.2014 | 212/14 | 14/04429-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 198/15 | 14/04429-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 186/15 | 14/04429-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 26/16 | 14/04429-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 28/16 | 14/04429-1 |

## Málslýsing:
Fyrireikingin, við at víðka um Skansabryggjuna og Eystara havnaøki við uml. 163.000 $m^2$ og eini atløgusíðu uppá uml. 700 m, er nú komin so væl áleiðis, at klárt er at broyta almennu byggisamtyktina sambært ætlanini. (journal nr. 14/00896).

Umhvørvisárinskanning fyri útbyggingina er send Umhvørvisstovuni til góðkenningar, modelroynd og aldusimuleringar eru gjørdar á DHI og Yvirfriðingarnevndin hevur játtað útbyggingini.

Áðrenn farið verður undir arbeiðið, er neyðugt at víðka B1-havnaøki í almennu byggisamtyktini fyri ætlaðu útbyggingina.

## Tilmæli:
Tekniski stjórin mælir til at B1-havnaøki í almennu byggisamtyktini verður víðkað sambært kortskjali, dagfest 23.09.2014.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Politisk avgerð er gjørd um broyting av útbyggingarætlanunum (sí mál nr.15/00833), tí verður uppskotið til víðkan av B1 havnaøkinum í almennu byggisamtyktini broytt samsvarandi nýggju útbyggingarætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nýggja uppskotið, dagfest 19.10.2015, til broyting av almennu byggisamtyktini verður góðkent.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tjóðveldi legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Málið er ikki búgvið at taka støðu til, so leingi tað ikki er greitt, hvussu málið um almennu byggisamtyktina verður viðgjørt víðari og mælir frá at samtykkja uppskotið.

Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og trimum ímóti. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Sigrun Mohr, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

Broytingaruppskotið hjá Tjóðveldi kom sostatt ikki til atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla broytingini av almennu byggisamtyktini í sambandi við endurskoðaðu útbyggingini av eystara havnaøki, var 4. januar. Einki mótmæli var móttikið ímóti ætlaðu broytingini av byggisamtyktini.

Í fráboðan frá Yvirfriðingarnevndini, dagfest 23. desember 2015, verður sagt, at nevndin á fundi hin 14. desember 2015 hevur tikið avgerð um, at grótkastið undir Skansanum skal flytast góðar 30 m suðureftir.

Vinnunevndin hevur á fundi 29. desember 2015 samtykt at tillaga projektið sambært avgerðini hjá Yvirfriðingarnevndini. (j.nr. 14/00896-37).

Broytingin av byggisamtyktini má eisini tillagast avgerðini hjá Yvirfriðingarnevndini og leggjast fyri býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina til góðkenningar.

Umsitingin metir ikki at tað er neyðugt við eini nýggjari hoyring av broytingini av byggisamtyktini, tí talan er um eina skerjing av økinum, sum verður løgd undir byggisamtyktina, í mun til uppskotið, sum hevur ligið frammi til hoyringar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna tillagaða uppskotið, dagfest 5. januar 2016, til broyting av almennu byggisamtyktini og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Helena D. á Neystabø og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen

Greiddu ikki atkvøðu:
Elin Lindenskov, Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

# 29/16 Broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy - víðkan av D-økinum við Ungmannafelagið Royndin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 21/16 | 15/04687-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 29/16 | 15/04687-1 |

**Málslýsing:**
Ungamannafelagið Royndin í Nólsoy hevur søkt um at byggja afturat felagshúsinum (j.nr. 15/03428). Húsið stendur á matr. nr. 144, á Mýruni. Við ætlaðu útbyggingini er grundstykkið ov lítið sambært byggisamtyktini, og tí hevur felagið søkt kommununa um at keypa ein part, uml. 425 $m^2$, av grannaognini matr. nr. 208a, at leggja saman við matr. nr. 144, soleiðis at grundstykkið verður stórt nokk til ætlaðu útbyggingina.

Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy í D-øki, ið er ætlað til t.d. mentanarlig endamál, almennar stovnar v.m. Ognin liggur uppat matr. nr. 208a, sum sambært byggisamtyktini E-alment frítíðarøki, sum er lagt av til ítróttarvøll, spælipláss v.m.

Í fyrstu syftu metti kommunan, at teir ætlaðu 425 $m^2$ kundu leggjast afturat matr. nr. 144, uttan at broyta byggisamtyktina. Man metti at at tað var nakað í vegin fyri at økið undir bygninginum var D-øki og ein partur av uttanumøkinum var E-øki, av tí at mentanarlig endamál og alment frítíðarøki, ítróttur og spælipláss væl kunnu virka saman. Tí samtykti Býráðið á fundi 30. september 2015, at selja Royndini 425 $m^2$ av matr. nr. 208a til at leggja saman við matr. nr. 144, Nólsoy.

24. november 2015 kemur skriv frá Umhvørvisstovuni við avgerð um, at umbønin um at fáa økini samanløgd ikki er gingin á møti við tí grundgeving, at umsóknin ikki er í tráð við galdandi byggisamtykt fyri Nólsoy.

Tí hevur umsitingin gjørt eitt uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy, soleiðis at uml. 480 $m^2$ av E-økinum á matr. nr. 208a verður broytt til D-øki.

**Tilmæli:**
Tekninski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Nólsoy verður broytt soleiðis, at uml. 480 $m^2$ av E-økinum á matr. nr. 208a verður broytt til D-øki sambært kortskjali dagf. 15.12.2015.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

# 30/16 Broyting av almennu byggisamtyktini í sambandi við grótbrot á Glyvursnesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 22/16 | 15/04855-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 30/16 | 15/04855-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu útbyggingina av eystara havnaøki verða fyrireikingar gjørdar til at gera eitt grótbrot, suður úr verandi grótbroti á Glyvursnesi, har tilfar til havnaútbyggingina skal heintast.

Grótbrotið skal ætlandi verða uml. 82.000 $m^2$ til støddar.

Seinast vestara havnaøki var útbygt, mitt í 1980 árunum, var grótbrot gjørt á Glyvursnesi uttan at hetta var partur av almennu byggisamtyktini, men í samskifti við Umhvørvisstovuna er tað gjørt greitt, at komandi grótbrotið skal verða staðsett á kortinum fyri almennu byggisamtyktina.

Umsitingin mælir til, at ætlaða grótbrotið, saman við verandi grótbroti á Glyvursnesi, verður lagt í ein nýggjan umráðispart B11 í almennu byggisamtyktini.

Ásetingar fyri umráðispartin B11 í 3. grundumráði:

1 Umráðisparturin verður lagdur til grótbrot og virksemi, ið hevur samband við hetta.

Ætlanin er at brúka grótbrotini til tyrvingarpláss og møguliga til rottangatøming og tílíkt, tá ið liðugt er at brúka tey til grótbrot.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðkennir broyting av almennu byggisamtyktini við nýggjum umráðisparti B11 við ásetingini «Umráðisparturin verður lagdur til grótbrot og virksemi, ið hevur samband við hetta» og broyting av kortinum sambært kortskjali, dagf. 18.12.2015 og beinir málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Helena D. á Neystabø og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Sigrun Mohr, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

# 31/16 Arbeiði at dagføra kloakkir í Tórshavnar kommmunu sambært góðkendari spillivatnsætlan til 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 26.02.2014 | 7/14 | 14/01352-11 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 2/16 | 14/01352-11 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 19/16 | 14/01352-11 |
| 4 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 31/16 | 14/01352-11 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá 7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

Ætlanin fevnir sum kunnugt um:
1. Lýsing av spillivatnsskipanini, íroknað bygnað, tilfar, aldur, reinsing og kloakkeringsøkið
2. Slag og nøgd av spillivatni, ið verður og fer at verða leitt gjøgnum leiðingarnar
3. Útleiðingarstøð og umhvørvi rundanum, t.d. botn- og vatngóðsku og streymviðurskifti
4. Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini
5. Eftirlit og røkt av spillivatnsskipanini
6. Meting um væntaða menning í kommununi hvat fólkatali og ídnaðartilgongd viðvíkur, og hvønn týdning menningin hevur fyri samansetingina og nøgdina av spillivatni, og fyri umhvørvið, ið spillivatnið verður leitt út í
7. Grundgivna raðfesting av nær ætlaða kloakkeringsarbeiðið verður framt, og nær tað væntandi verður liðugt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Grundað á fyribils metingar hevur umsitingin mælt til at raðfesta arbeiðini í nevndu spillivatnsætlan soleiðis, at játtanin var í hesi raðfylgju í 2012: 7,5 mió., í 2013: 7,5 mió. og í 2014: 4,1 mió.

Spillivatnsætlanin fevnir um dagføring av kloakkum í umleið 20 ymsum støðum í allari kommununi og fyri at fáa útgreinað ítøkiligari hvussu fíggjartørvurin fyri hesi arbeiði fer at verða, er ætlanin at fara undir miðvísa projektering av kloakkarbeiðunum í nøkrum av hesum støðum. Eftirfylgjandi verður farið undir tilgongd at fáa fígging til at fremja nevndu kloakkarbeiði.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og ynskir umsitingin við hesum at fáa loyvi at bjóða serstøk økið út til ráðgevandi virki at gera skitsuprosjekt og kostnaðarmeting av ávísum økjum, sum umsitingin vísir á.
Talan er um niðanfyri standandi øki:

1. **<u>Kloakkir í Kollafirði</u>**
   Fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni, er ætlanin at gera arbeiðið liðugt at savna allar kloakkir í Kollafirði, Kollfjarðardali og Hundsarabotni í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Miðað verður eftir at savna so nógvar útleiðingar saman sum møguligt, áðrenn tær verða

leiddar út á sjógv minst 1 m undir størstu fjøru. Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørdur, talan er um Norðuri í Sundinum í Líðini og á Oyrareingjum.

2. **Kloakkir í Kaldbak og Kaldbaksbotni**
Ætlanin er at samla allar kloakkir í Kaldbak í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt, við Á er útleiðing lóglig. Inn á Gørðum og inni á Fløtum er kloakkin leidd í skipaðar leiðingar.

3. **Kloakkir við Bakkagøtu og á Argjaboða á Argjum**
Ætlanin er framhaldandi at samla kloakkirnar á Argjum í skipaða leiðing og út á sjógv fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni. Talan er um kloakkútleiðingar við Bakkagøtu og Argjaboða

Partur av arbeiðinum at fylgja krøvinum fá Umhvørvisstovuni er longu gjørt, við Sjósavnið, við Bátahylin og frá kloakkini frá Kongavarða/Hamrinum.

4. **Kloakkir í Syðradali og Norðadali**
Henda ætlanin er at samla kloakkirnar ávikavist í Syðradali og Norðadali í skipaða leiðing fyri at lúka krøvunum frá Umhvørvisstovuni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta:
1) kr. 300.000,- til projektering av kloakkum í Kollafirði
2) kr. 150.000,- til porjektering av kloakkum í Kaldbak og Kaldbaksbotni
3) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum við Bakkagøtu og á Argjabooða á Argjum
4) kr. 100.000,- til projektering av kloakkum í Syðradali og Norðadali
ella samanlagt kr. 700.000,- til tey 4 omanfyri standandi arbeiði av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini spyrja hvør arbeiðsætlan fyriliggur fyri Kaldbak. Hvussu nógv av teimum 150.000 kr eru brúktar.

**Kaldbaksnevndin 18. september 2013:**Umsitingin kunnaði um at projekteringsarbeiðið er í gongd við atliti til at gera arbeiðið í næsta ár.

**-Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá 7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

**Fíggjarlig viðurskifti.**

Biðið verður um kr. 400.000 til projektering av framfluttum íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012, kt. 6875.

5. **Kloakkir á Hvítanesi**
   Ætlanin er at samla allar kloakkir á Hvítanesi í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

   Største parturin at skipa leiðingarnar á Hvítanesi er longu gjørt og er ætlanin at beina hesar leiðingar í góðkenda leiðing sunnan fyri Hvítanes.

6. **Kloakkir í Kirkjubø og á Velbastað**
   Ætlanin er at samla allar kloakkir ávíkavist í Kirkjubø og á Velbastað í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt og fevnir arbeiðið um at skipa so fyri at útleiðingarnar lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni við at leiðingarnar koma minst 1 m. undir størstu fjørðu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta:
5) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum á Hvítanesi
6) kr. 250.000,- til projektering av kloakkum í Kirkjubø og Velbastað
   ella samanlagt kr. 400.000,- til tey 2 omanfyri standandi arbeiði av framfluttum íløgum fyri kloakkir fyri 2012 konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. november 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. november 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjektuppskot fyri Kirkjubø og Velbastað at savna allar kloakkir í skipaða leiðing út á streymasjógv er liðugt. Á Velbastað er ætlanin at savna tær núverandi 4 útleiðingar á sjógv í eina skipaða leiðing, sum verður veitt út á streymasjógv, so útleiðingin líkur krøvini frá Umhvørvisstovuni. Sí j.nr 15/03558.

Í Kirkjubø er ætlanin at savna allar kloakkirnar í verandi útleiðing á Sjógv. j.nr. 15/03200.

Ætlanin er, at fáa PB Consult gera prosjekt klárt til útbjóðing og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2016, kt. 6875 til gerð av útbjóðingartilfari.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkir fyri 2016 konto 6875 til at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Nevndin staðfestir, at játtaður peningur sambært samtykt 28. november 2013 er nýttur til støðulýsing/heildarætlan fyri økini á Hvítanesi, Kirkjubø og Velbastað og ikki til projektering.
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 20:45</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Jan Christiansen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |
| | Sigrun Mohr | |